ISBN 99918-60-06-1

# Sjúkrarøktarfrøðingur í 2006

## - ein trivnaðarkanning

Karin Jóhanna L. Knudsen og Martha H. Mýri

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 12/2006**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. kanningararbeiði, sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvísingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

# INNIHALDSYVIRLIT

FORMÆLI ....4
ÚRTAK ....6

**1. PARTUR: ENDAMÁL, ÁSTØÐI OG FRAMFERÐARHÁTTUR ....10**

ENDAMÁL VIÐ KANNINGINI ....11
ÁSTØÐI ....12
*Sjúkrarøktarfrøðingar í refleksiva samfelagnum ....12*
*Trivnaður á arbeiðsplássum....14*
*Krøv ....15*
*Stýring og ávirkan ....16*
*Stuðul ....17*
FRAMFERÐARHÁTTUR....18
*Fyrimunir og vansar við ymiskum háttaløgum ....18*
*Fylgibólkur....19*
*Sundurgreining av krøvum, ávirkan og stuðli....20*
*Bygnaður av spurnablaði og umboðan....23*
*Dátuinnsavning og viðgerð ....24*

**2. PARTUR: LÝSING AV STARVINUM HJÁ SJÚKRARØKTARFRØÐINGUM ..26**

EYÐKENNI VIÐ STARVINUM....27
NÆRUMHVØRVIÐ HJÁ SJÚKRARØKTARFRØÐINGINUM....28
*Arbeiðstíðir og karmar í arbeiðinum....30*
FJARUMHVØRVIÐ HJÁ SJÚKRARØKTARFRØÐINGINUM....34
SAMANDRÁTTUR ....36

**3. PARTUR: NØGDSEMI MILLUM SJÚKRARØKTARFRØÐINGAR....37**

NØGDSEMI SUM HEILD ....38
*Fleiri umhugsað at søkja annað starv ....39*
TAÐ GÓÐA ARBEIÐIÐ ....41
*Hvat er eitt gott arbeiði?....41*
*Tað góða arbeiðið og nøgdsemi....43*
SAMANDRÁTTUR ....44

**4. PARTUR: KRØV Í ARBEIÐINUM ....45**

KRØV, GREIDLEIKI OG MÁTIN EVNINI VERÐA NÝTT Í ARBEIÐINUM. ....46
KVANTITATIV KRØV ....48
KVALITATIV KRØV ....50
SAMANDRÁTTUR ....52

**5. PARTUR: ÁVIRKAN Í ARBEIÐINUM ....53**

SJÁLVRÆÐI ....54
FØRLEIKAMENNING....55
SAMANDRÁTTUR ....57

6. PARTUR: STUÐUL ....59

ARBEIÐSUMHVØRVIÐ SUM HEILD ....60
LEIÐSLUVIÐURSKIFTI ....64
STARVSFELAGAR ....67
SAMSÝNING ....68
SAMANDRÁTTUR ....69

7. PARTUR: TEY NØGDU OG TEY ÓNØGDU ....71

EYÐKENNI VIÐ TEIMUM NØGDU OG ÓNØGDU ....72
*Nøgdsemi og aldur* ....*72*
*Nøgdsemi og arbeiðsøki* ....*73*
*Nøgdsemi og arbeiðstíðir* ....*74*
*Nøgdsemi og sjúkrafrávera* ....*74*
*Nøgdsemi og umhugsa at søkja annað starv* ....*75*
*Nøgdsemi broytt seinnu árini* ....*76*
*Tað góða arbeiðið* ....*76*
*Krøv og nøgdsemi* ....*77*
*Ávirkan og nøgdsemi* ....*79*
*Stuðul og nøgdsemi* ....*80*
SAMANDRÁTTUR ....82

8. PARTUR: SAMANBERINGAR VIÐ STØÐUNA UTTANLANDS ....84

GRUNDARLAG UNDIR SAMANBERINGUNUM ....85
NØGDSEMI ....86
SJÚKRAFRÁVERA ....87
UMHUGSA AT SØKJA ANNAÐ STARV ....88
KRØV Í ARBEIÐINUM ....88
TILFEINGI Í ARBEIÐINUM ....89
SAMANDRÁTTUR ....91

9. PARTUR: NIÐURSTØÐA & TILRÁÐINGAR ....92

NIÐURSTØÐA ....93
TILRÁÐINGAR ....94

BÓKMENTIR OG KELDUR ....97

ÍSKOYTI: SPURNARBLAÐ ....101

## Formæli

Sjúkrarøktarfrøðingur í 2006 – ein trivnaðarkanning er evnið, sum verður viðgjørt í hesi frágreiðing.

Kanningin byggir á eina spurnablaðskanning, sum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar (hereftir FFS) heitti á Granskingardepilin fyri Økismenning um at gera. Sjálv spurnakanningin varð gjørd í juni mánaði 2006 og høvuðsviðgerðin av hesum tilfari í tíðarskeiðinum juni – oktober 2006.

Limirnir í felagnum starvast víða innan heilsuøkið - á sjúkrahúsunum, á røktar- og ellisheimum, í sambýlum, innan heimarøktina, innan heilsurøktina og við undirvísing og ráðgeving[1]. Felagið ynskir at fáa eina heildarmynd av, *hvussu sjúkrarøktarfrøðingar trívast í arbeiðinum, og um trivnaðurin møguliga er broyttur seinnu árini.*

Sparingar, yvirtøkur av viðgerðum, umleggingar og broytingar innan heilsuverkið eru týðandi orsøkir til, at felagið heldur, at tørvur er á einari tílíkari kanning. Tíðin til sjúklingin/brúkaran er vorðin styttri, og størri krøv verða sett til tvørfakligt arbeiði, menning og samskipan av uppgávunum.

Harafturat broytist samfelagið við rúkandi ferð. Hetta setur krøv til støðuga førleikamenning, samstundis sum sjúklingurin/brúkarin eisini er vorðin meira tilvitaður um sín egna tørv. Hetta setir eisini nýggj og avbjóðandi krøv til tær uppgávur, sum sjúkrarøktarfrøðingar røkja innan heilsuverkið. Nøktandi førleiki, góðir møguleikar fyri menning og trivnaður í arbeiðinum eru tí av alstórum týdningi fyri starvið sum sjúkrarøktarfrøðingur.

Trivnaðarkanningin er gjørd av samfelagsfrøðingunum Karin Jóhannu L. Knudsen og Marthu H. Mýri. FFS setti ein arbeiðsbólk, sum hevur havt til uppgávu at fylgja við og stuðla arbeiðinum. Í hesum bólki hava sitið: Jana H. Dalsgaard, Jóhanna Danielsen, Anna á Dunga, Elsebeth Højgaard og Petra Mikkelsen. Hesin bólkurin og nevndin í FFS hava verið okkum góðir stuðlar í

[1] Í frágreiðingini er heitið **sjúkrarøktarfrøðingur** nýtt um allar limir hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Hetta er av praktiskum ávum. Liminir fevna víða við serútbúgving sum t.d. heilsufrøðingar, narkosusjúkrarøktarfrøðingar v.m. Er tørvur á at tilskila í frágreiðingini, at talan er um ein ávísan limabólk verður hetta sjálvsagt gjørt.

arbeiðinum, sum vit takka fyri. Somuleiðis takka vit Hansu Christiansen, skrivara hjá FFS, fyri góða hjálp. Eisini hava Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, og Gestur Hovgaard, PhD í samfelagsfrøði, veitt okkum góða hjálp.

Fyrsti partur í frágreiðingini greinar framferðarhátt og ástøði, ið eru karmar um kanningina. Teir fylgjandi partarnir eru ein framløga av teimum innsavnaðu upplýsingunum og úrslit av kanningini. Tað er hugburðurin hjá sjúkrarøktarfrøðingunum í Føroyum, og hvussu teir tulka ymisk viðurskifti í teirra arbeiði, sum vit leggja fram. Aftan á hvønn partin er ein stuttur samandráttur av høvuðsinnihaldinum í viðkomandi parti. Tá vit endurgeva skrivligar viðmerkingar, sum sjúkrarøktarfrøðingarnir hava gjørt í spurnablaðnum, verður tað gjørt júst, sum teir hava skrivað viðmerkingarnar. At enda verður ein niðurstøða gjørd umframt tilráðingar um, hvørji viðurskifti áttu at verið kannað gjøllari, viðurskifti ið hava týdning fyri trivnað og arbeiðsumstøður hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum, men sum ikki eru møgulig at eftirkanna við tí vitan og tilfari, sum er til taks.

November 2006

Karin Jóhanna L. Knudsen & Martha H. Mýri

## Úrtak

Hendan frágreiðingin er úrslit av trivnaðarkanningini, sum varð gjørd millum limirnar í FFS í juni 2006.

Kanningin byggir á eina spurnablaðskanning, har 746 spurnabløð vórðu send út til allar limirnar í FFS undantikið pensjónistar. Av hesum valdu 414 sjúkrarøktarfrøðingar at svara, sum gevur eitt svarprosent uppá 55%.

Kanningin viðger trivnaðin hjá sjúkrarøktarfrøðingum í teirra arbeiði sum heild, og í hvønn mun sjúkrarøktarfrøðingar meta, at viðurskifti, sum hava týdning fyri trivnaðin, eru nøktandi. Í hesum sambandi er viðgerðin av trivnaðinum býtt upp í tríggjar partar - krøv, ávirkan og stuðul.

Dagliga arbeiðið hjá sjúkrarøktarfrøðingum umfatar í stóran mun heilsufyribyrgjandi røkt, heilsufremjandi røkt og samskipan av røkt. Starvið er eyðkent av nógvum ymiskum arbeiðsuppgávum, har teir skulu fyrihalda seg til nógvar ymiskar bólkar t.d. brúkarar, aðrar fakbólkar og avvarðandi.

Kanningin vísir, at umleið helvtin av sjúkrarøktarfrøðingunum eru nøgdir við fysisku karmarnar og amboðini, meðan umleið helvtin eru ónøgdir. Sjúkrarøktarfrøðingar, ið arbeiða innan læknaviðtalu, heimarøkt, ellis/røktarheim og sjúkrahús eru betri nøgdir við fysisku karmarnar enn teir, sum arbeiða innan heilsurøkt, sambýli o.t. og undirvísing og ráðgeving. Tey sum arbeiða innan undirvísing og ráðgeving eru tó væl nøgd við tey amboð (bilur, fartelefon, telda, v.m.), tey hava í arbeiðinum. Sjúkrarøktarfrøðingarnir, sum arbeiða innan heilsurøkt meta í størri mun at amboðini ikki eru nøktandi.

Ein meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingum halda ikki, at teirra arbeiði verður virt av politisku myndugleikunum í nóg stóran mun. Tað kemur fram í samrøðum og í viðmerkingum, at hendan vantandi virðingin frá teimum politisku myndugleikunum partvíst sæst aftur í, at sjúkrarøktarfrøðingar halda, at lønin er alt ov lág í mun til arbeiðsnøgd og ábyrgd í arbeiðinum. Hon sæst eisini partvíst aftur í ónøgdini við teir karmar og tey amboð, sum eru í arbeiðinum.

Kanningin vísir, at sjúkrarøktarfrøðingar, sum heild, eru nøgdir í teirra starvi. Hinvegin vísir kanningin eisini, at nøgdsemið er minkað seinastu árini, og at ein greiður meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingum umhugsa at søkja annað starv.

Tá ið sjúkrarøktarfrøðingarnir í hesi kanning verða bidnir um at lýsa tað góða arbeiðið koma tvey áhugaverd úrslit fram. Sjúkrarøktarfrøðingar raðfesta karrierumøguleikarnir sera lágt. Góð leiðsla hevur stóran týdning í teirra arbeiði, men tað tykist ikki, sum um leiðarastørv eru dragandi fyri sjúkrarøktarfrøðingin.

Arbeiðið hevur stóran týdning fyri sjúkrarøktarfrøðingar og teir eru stoltir av sínum starvi. Tølini vísa eisini, at hjá tveimum triðingum av sjúkrarøktarfrøðingunum uppfyllir núverandi starvið tað, ið hesin samfelagsbólkurin metir sum eitt gott arbeiði.

Krøvini til sjúkrarøktina eru økt í tráð við øktu krøvini, ið borgarin hevur til samfelagið sum heild. Hetta merkja sjúkrarøktarfrøðingarnir eisini í teirra dagliga arbeiði. Kanningin saman við skrivligu viðmerkingunum vísir, at starvið sum sjúkrarøktarfrøðingur er kravmikið í vavi eins og í dygd. Arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og ofta fløktar, við tað at teir skulu taka atlit til fleiri bólkar í arbeiðinum í senn. Meira enn ein triðingur av sjúkrarøktarfrøðingum halda ikki, at samsvarið millum tal av brúkarum fyri hvønn sjúkrarøktarfrøðing er nøktandi.

Ein greiður meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingunum halda, at teirra starv er krevjandi kognitivt. Arbeiðið krevur yvirlit, at teir duga væl at koma við hugskotum, og at teir minnast nógv. Krøvini í arbeiðinum siga tó ikki so nógv í sjálvum sær, men muga metast í mun til tað tilfeingi, sum sjúkrarøktarfrøðingar hava "atgongd" til á teirra arbeiðsplássi.

Tilfeingið á einum arbeiðsplássi eru ávirkan og stuðul í arbeiðinum.

Sjálvræði og førleikamenning eru avgerandi fyri, hvussu stóra ávirkan sjúkrarøktarfrøðingarnir meta, at teir hava á arbeiðsplássinum. Ein meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingum halda seg hava ávirkan á, hvat teir gera í dagliga arbeiðinum, men ikki í so stóran mun tá tað kemur til, hvussu nógv teir skulu gera, hvønn teir arbeiða saman við, og hvørjar avgerðir verða tiknar um teirra

arbeiði. Tað vísir seg at vera ein stór ónøgd við møguleikarnar fyri førleikamenning og eftirútbúgving. Kortini halda meira enn helmingurin, at teirra fakligi førleiki antin er sera góður ella góður.

Stuðul í arbeiðinum verður lýstur sum stuðul frá leiðslu, stuðul frá starvsfeløgum og løn í arbeiðinum. Ein meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingunum eru nøgdir við sosiala umhvørvið sum heild í arbeiðinum. Tó so kemur fram, at meira enn helvtin av sjúkrarøktarfrøðingunum halda, at tað í stóran ella ávísan mun eru ov nógvar óloystar ósemjur. Tað kemur eisini fram, at meira enn helvtin halda, at leiðslustílurin er orsøkin til ósemjurnar. Somuleiðis sigur eisini onnur hvør, at viðurskiftini millum leiðslu og starvsfólk eru minni góð ella als ikki góð. Kritikkurin av leiðsluni kemur eisini fram, tá talan eru um raðfesting av trivnaði á arbeiðsplássinum, tilrættalegging av arbeiði, at loysa konfliktir, supervisjón, herðaklapp og fakliga sparring. Kanningin vísir, at sjúkrarøktarfrøðingar fáa mesta stuðulin, sparring og feedback frá starvsfeløgum heldur enn frá leiðsluni.

Kanningin vísir týðuliga, at sjúkrarøktarfrøðingar als ikki eru nøgdir við lønina teir fáa fyri arbeiðsnøgd og ta ábyrgd, teir hava í arbeiðinum.

Samanbera vit teir nøgdu og teir ónøgdu sjúkrarøktarfrøðingarnar síggja vit, at tað er ein samanhangur millum nøgdsemi og aldur, nøgdsemi og arbeiðstíðir, nøgdsemi og sjúkradagar, nøgdsemi og umhugsan um at søkja annað starv.

Kanningin vísir, at millum tey nøgdu eru eldru aldursbólkarnir lutfalsliga størri, og at millum tey nøgdu eru tey, sum arbeiða dagvakt, betri umboðað. Hinvegin eru millum tey ónøgdu teir yngru aldursbólkarnir og tey, sum arbeiða í skiftandi vaktum, betri umboðað.

Tey nøgdu hava færri sjúkradagar enn tey ónøgdu. Tey nøgdu umhugsa í nógv minni mun enn tey ónøgdu at søkja annað starv. Hjá teimum nøgdu samsvarar starvið betur við tað, tey lýsa, sum tað góða arbeiðið enn hjá teimum ónøgdu. Kanningin vísir, at hjá teimum ónøgdu er ónøgdin broytt til tað verra seinnu árini.

Tað sýnist ikki at vera stórvegis munur á hugburðinum hjá teimum nøgdu og ónøgdu til tey krøv, ið tey møta í arbeiðinum. Hinvegin síggja vit ein mun, tá

talan er um ávirkan og stuðul. Tey nøgdu meta, at tey hava størri ávirkan í arbeiðinum og fáa størri stuðul frá leiðsluni enn tey ónøgdu. Bæði tey nøgdu og tey ónøgdu halda, at møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving ikki eru nøktandi.

Fyri at fáa betri fatan av trivnaðin millum sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum hava vit valt at samanbera við eina kanning millum sjúkrarøktarfrøðingar í Danmark. Út frá hesum kunna vit siga, at sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum eru sum heild væl nøgdir við sítt starv, men ikki eins væl nøgdir og sjúkrarøktarfrøðingarnir í Danmark.

Sjúkrafráveran er væl lægri millum sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum enn í Danmark. Kortini eru tað nógv fleiri sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum, sum umhugsa um at søkja annað starv, enn tað eru í Danmark.

Kvantitativu krøvini verða mett nøkulunda eins í báðum londunum. Hinvegin meta sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum tey kvalitativu krøvini at vera størri enn sjúkrarøktarfrøðingar í Danmark. Hetta er í sær sjálvum ikki ein trupulleiki, um so er, at tilfeingið at møta hesum krøvum eru samsvarandi stórt. Her er ein munur á viðurskiftunum í Føroyum og í Danmark. Sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum meta ikki, at tilfeingið, serliga leiðsludygdin og sosialur stuðul frá leiðslu eru nøktandi. Tað eru tey kvalitativu krøvini, serliga krøv um goymdar kenslur, sum verða mett hægri av sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum. Hugsast kann at hetta er orsøkin til at sjúkrarøktarfrøðingarnir í Føroyum meta, at tørvurin á góðari leiðslu og stuðul frá leiðsluni t.d. við supervisjón og herðaklappi, er stórur í arbeiðinum.

# 1. Partur: Endamál, ástøði og framferðarháttur

## Endamál við kanningini

Í Føroyum hava nógvar broytingar verið innan heilsuverkið síðani síðst í 1980unum. Hesar broytingar merkjast innan heilsuverkið. Tíðin til sjúklingin er vorðin stytt, normeringar, sum fyrr tryggjaðu, at arbeiðsbyrðan hjá sjúkrarøktarfrøðingum ikki varð ov stór, eru í stóran mun burtur, og krøvini til fakliga førleikan hjá sjúkrarøktarfrøðingum eru økt. Samstundis sum hesar skerjingar eru framdar, eru eisini fleiri viðgerðir tiknar heim til Føroya. Harumframt eru nógvar umleggingar í heilsuverkinum farnar fram seinastu árini. Millum annað eru deildir á Landssjúkrahúsinum lagdar saman og barnaverndarskipanin, heilsuskipanin, heimarøktin og serforsorgin eru skipaðar av nýggjum.[2]

Hesar broytingar hava havt stóra ávirkan á starvið sum sjúkrarøktarfrøðingur. Krøvini til tvørfakligt samstarv og betri samskipan av uppgávunum eru økt. Ein onnur avleiðing av øllum broytingunum er, at sjúkrarøktarfrøðingar nú skulu arbeiða á deildum í sjúkrahúsverkinum, ið eru samansettar av fleiri servitanarøkjum. Sambært samrøðu við FFS skal ein sjúkrarøktarfrøðingur í onkrum førum í dag hava vitan um eini 6-8 serøki, har tað fyrr kanska bert var talan um eini tvey serøki.

Sambært samrøðum við FFS, so hava umleggingarnar í heilsuverkinum eisini ført við sær, at innleggingartíðin hjá sjúklingum er vorðin stytt. Viðgerðir á sjúkrahúsum eru intensivari - sjúklingarnir krevja meira, ta tíðina teir liggja á sjúkrahúsinum. Fyrr vóru nakrir sjúklingar krevjandi, meðan nakrir vóru væl fyri. Nú tykist tað, sum um allir eru sera krevjandi. Umleggingarnar viðføra eisini størri krøv til teir sjúkrarøktarfrøðingar, sum starvast í heimarøktini og í øðrum økjum innan primerrøktina.

FFS metir, at trýstið á tann einstaka sjúkrarøktarfrøðingin er størri í dag enn fyri bert fáum árum síðani, og ynskir tí við eini trivnaðarkanning at fáa eina ábending, um hetta er so. Felagið ynskir at fáa eina heildarmynd av, hvussu sjúkrarøktarfrøðingar trívast í sínum arbeiði, og um trivnaðurin møguliga er

[2] Sí t.d. notu 3 og Lanssjúkrahúsið: ársfrágreiðing 2005. www.lsh.fo.

broyttur seinnu árini. Við omanfyri standandi í huga verða arbeiðssetningarnir í kanningini hesir:

- Hvussu trívast sjúkrarøktarfrøðingar í sínum arbeiði sum heild?
- Í hvønn mun meta sjúkrarøktarfrøðingar, at viðurskifti, sum hava týdning fyri trivnaðin í arbeiðinum eru nøktandi?

## Ástøði

### *Sjúkrarøktarfrøðingar í refleksiva samfelagnum*

Tey berandi ástøðiligu hugtøkini í frágreiðingini/viðgerðini av trivnaðinum verða *krøv, ávirkan og stuðul*. Kanningar av arbeiðsumstøðum og trivnaði aðrastaðni hava víst, at hesir tríggir faktorar eru altavgerandi fyri trivnaðin í einum arbeiði (Karasek & Theorell, 1990; Staff, 2002). Hugtøkini verða lýst nærri niðanfyri, men fyrst skulu vit gera eina stutta lýsing av, hvørji krøv okkara samfelag sum heild setur til einstaklingin og arbeiðið.

Fyri at greina arbeiðsumstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum, er av stórum týdningi at skilja tær kreftir, sum eru galdandi fyri samfelagið í dag. Samfelagsligar broytingar kunnu lýsast á ymiskan hátt, men ofta verða tær lýstar sum eitt skifti frá einum tradisjonellum til eitt modernað samfelag. Í hesum liggur, at vit eru farin frá einum bóndasamfelag til eitt ídnaðarsamfelag og nú inn í tað, sum ofta verður kallað *refleksiva samfelagið,* har lyklaorðini eru *globalisering* og *refleksivitetur.*

Tað, sum eyðkennir globaliseringsgongdina er, at geografiskar og politiskar forðingar fyri búskaparligum virksemi minka og í nógvum førum hvørva. Eitt annað sermerki við globaliseringsgongdini er, at ymiskar mentanir ávirka hvør aðra, og at samskiftismøguleikarnir nærum eru óavmarkaðir. Globaliseraði heimurin gevur okkum eitt ótal av møguleikum. Bretski sosiologurin Anthony Giddens tosar um, at tað er hend ein radikalisering av modernitetinum. Við

hesum meinar Giddens, at vit fyrihalda okkum til, hvussu vit fyrihalda okkum – haðani hugtakið refleksivitetur. Lívið er vorðið eitt prosjekt, har tað sentrala er okkara evni at broyta okkum og at seta spurningar við lívsins viðurskifti. Tíð og stað eru býtt sundur. Vit kunnu samskifta við fólk úr øllum heiminum uttan at flyta okkum geografiskt. Vitan er vorðin alneyðug, tí vit sum menniskju støðugt skulu taka avgerðir– ikki bara taka avgerðir, men tær røttu avgerðirnar. Manglandi vitan kann føra til skeivar avgerðir. Týski sosiologurin Ulrich Beck brúkar hugtakið "váðasamfelagið." Beck leggur dent á, at samstundis sum vit fáa frælsi at velja, so er vandin fyri at velja skeivt alla tíðina til staðar. Harafturat eru vit vorðin meiri varug við teir vandar, sum ídnaðarsamfelagið hevur ført við sær – dálking, náttúruoyðingar, fuglakrím v.m.

Ambivalensur, fjølbroytni og áhaldandi broytingar eyðkenna samfelagið í dag. Hesar broytingar ávirka sjálvsagt eisini tær uppgávur, ið staturin/tað almenna skal røkja og harvið eisini almanna- og heilsuøkið. At so er, síggja vit týðiliga á almenna kjakinum í Føroyum um almanna- og heilsumál[3]. Fyri tann einstaka sjúkrarøktarfrøðingin merkir hetta nýggj og onnur krøv til teirra yrkisføri og arbeiðsumstøður. Harafturat verða brúkararnir/sjúklingarnir betri og betri útbúnir og meiri tilvitaðir um egnu ynskir og egnan tørv, eins og avvarðandi og aðrir fakbólkar, sum eisini verða meiri medvitað um egnan tørv og eisini tørvin hjá sjúklinginum/brúkaranum. Sum eina natúrliga avleiðing av hesum vilja brúkarar/sjúklingar í dag sjálvi ogna sær vitan um sína sjúku. Eisini tøkniliga henda nógvar broytingar. Sum dømi kunnu nevnast elektroniskir sjúklingajournalir og nýggj elektronisk amboð á skurðdeildum. Men allar hesar broytingar merkja samstundis eisini, at sjúkrarøktarfrøðingar kunnu verða loystar úr bondum, sum áður hava stýrt teirra yrki og kunnu finna nýggjar leiklutir og uppgávur. Eitt dømi um hetta er, at útbúgvingin av sjúkrarøktarfrøðingum verður umskipað í hesum tíðum, og at ráðgeving fær alt størri leiklut í dagliga yrkinum hjá einum sjúkrarøktarfrøðingi.

[3] Sí t.d. Dimmalætting: 18/10-06, 23/5-06,2/2-06; Sosialurin: 11/9-06, 27/12-05, 18/5-05, 15/5-05, 9/5-05, 4/5-05, 24/4-05, 15/4-05, 6/4-05, 19/12-2002; Útvarp Føroya: 20/9-06, 2/9-06, 6/5-05, 18/3-05.

***Trivnaður á arbeiðsplássum***

Seinastu árini eru fleiri trivnaðarkanningar gjørdar millum sjúkrarøktarfrøðingar kring allan heimin. Ein orsøk til nógvu kanningarnar er, at gongdin í fleiri londum seinastu árini hevur verið, at sjúkrarøktarfrøðingar rýma úr starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur. Hetta kostar nógv fyri arbeiðsplássini bæði kvantitativt (fyri produktivitetin) og kvalitativt (fyri dygdina), tí tey missa dugnalig fólk við nógvum royndum, og muga ístaðin seta nýggj óroynd fólk í starv.

Fyri 100 árum síðani vóru fysisku viðurskiftini (t.d. løn, fysisku karmarnir) mett at vera sera týdningarmikil fyri trivnaðin/mistrivnaðin. Í dag verða psykososialu viðurskiftini hildin at vera av størri týdningi.

Tað er torført at finna eina nøktandi allýsing av hugtakinum *trivnaður*. Ein allýsing, sum verður nógv nýtt millum granskarar er tann hjá Locke (1976, s.1300) sum á enskum lýsir trivnað sum “ *a pleasurable or positive emotional state resulting from the appraisal of ones job or job experiences*”.

Trivnaður hevur nakað at gera við kenslur og metingar, sum einstaklingar hava um arbeiðsplássið, starvsfelagarnar, møguleikar, fysisku karmarnar, lønina og um hvussu gevandi arbeiði er.

Trivnaður kann lýsast uppá tveir mátar. Tann eini mátin er at lýsa trivnað, sum eina almenna kenslu av arbeiðinum sum heild. Hin mátin er at síggja trivnað í pørtum, sum kenslur og hugsanir um ymisk øki ella partar av arbeiðinum (Spector, 1997 í Staff 2002, s. 11). Í hesi kanning verður trivnaður lýstur bæði sum ein heild, ein almenn kensla av arbeiðinum, og í pørtum, har kannað verður, hvussu sjúkrarøktarfrøðingar trívast/mistrívast í ymiskum viðurskiftum av arbeiðinum.

Gransking hevur víst (Herzberg,1966; Karasek og Theorell, 1990), at tað ikki bert eru tey fysisku viðurskiftini, sum ávirka trivnaðin hjá einstaklingum, men at tey psykososialu viðurskiftini eisini hava stóran týdning.

Tey psykososialu viðurskiftini eru eitt úrslit av møtinum millum einstaklingin (t.e. sjúkrarøktarfrøðingin) og arbeiðsumhvørvið (t.d. arbeiðspláss/øki, har

sjúkrarøktarfrøðingurin starvast). Hesi viðurskifti lýsa sambandið millum krøvini frá umhvørvinum og tað tilfeingið, sum einstaklingurin hevur sum førning inn í hetta umhvørvið. Á fakmáli verður sagt, at psykososial viðurskifti kunna lýsast sum kognitiv (metingar) og affektiv (kenslulig). Við hesum meinast, at psykososialu viðurskiftini eru metingar og kenslur, ið eru knýttar at arbeiðinum, og tey kunna vera tilvitað ella ótilvitað fyri einstaklinginum (sjúkrarøktarfrøðinginum). Tað er t.d. ikki víst, at sjúkrarøktarfrøðingurin veit, at hann er strongdur. Tey psykososialu viðurskiftini eru sostatt eitt úrslit av subjektivum metingum og kenslum hjá einstaklinginum. Tað eru virðini og drívmegin aftanfyri einstaklingin, sum eru avgerandi fyri úrslitið, t.v.s. um einstaklingurin trívist ella mistrívist í arbeiðinum.

Í kanningum sum hesari er tí umráðandi at hava í huga, at viðurskifti so sum persónlig menning, at gera mun í arbeiðinum og góð viðurskifti starvsfelagar ímillum ber ikki til at máta leyst av menniskjansligari ávirkan.

Tað eru nøkur viðurskifti, ið ganga aftur í flestu kanningum. Karasek og Theorell (1990) hava ment ein frymil, har teir leggja størsta dentin á tríggjar faktorar, sum hava víst seg at gang aftur við atliti at trivnaði á arbeiðsplássum. Teir eru *krøv, ávirkan og stýring og stuðul í arbeiðinum*. Teirra útgangsstøði var, at krøv og stýring í arbeiðinum høvdu størst týdning fyri trivnaðin, men í granskingararbeiðinum komu teir fram á, at stuðul eisini hevði nógv størri týdning enn áður hildið. Hesi viðurskifti gingu eisini aftur í innleiðandi samrøðunum, sum vit gjørdu við sjúkrarøktarfrøðingar. Okkara viðgerð og lýsing av trivnaðinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum tekur støði í hesum trimum faktorunum.

### *Krøv*

Krøv er eitt vítt hugtak. Samanumtikið kunnu vit lýsa hugtakið sum tey krøv, ið einstaklingurin møtir á arbeiðsplássinum, og krøv sum einstaklingurin setur til sín sjálvs í arbeiðinum. Vanliga verður skilt ímillum *kvantitativ* og *kvalitativ* krøv í arbeiðinum. Kvantitativ krøv eru krøv um effektivitet og arbeiðsnøgd.

Sambært innleiðandi samrøðum við FFS kunnu sjúkrarøktarfrøðingar ofta uppliva tíðarneyð og kenna, at teir ikki strekkja til í arbeiðinum. Eitt annað eyðkenni við starvinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum er tað, sum oftani verður nevnt "handletvang" (bráðfeingishjálp). Kvalitativ krøv eru t.d. krøv um fløktar arbeiðsuppgávur, har neyðugt er at samarbeiða við ymiskar fakbólkar og vera "millumgongufólk" millum hesar fakbólkar, sjúklingar/brúkarar og avvarðandi. Í viðgerðini av teimum kvalitativu krøvunum, fara vit at skilja ímillum *kognitiv krøv* og *kenslulig krøv*.

Kanningar av arbeiðsumhvørvi sum heild (eisini í øðrum vinnugreinum) vísa, at bæði ov høg krøv og ov lág krøv í arbeiðinum kunna virka tyngjandi. Til dømis kann strongd skyldast bæði, at ein ikki megnar uppgávurnar, ein fær; ella at krøvini eru ov lág – t.v.s. at ein hevur førleikar og evni, sum røkka longur enn tey krøv, ein møtir í arbeiðinum.

### *Stýring og ávirkan*

Ávirkan merkir, at einstaklingurin hevur myndugleika at taka sjálvstøðugar avgerðir í arbeiðinum, og harafturat hevur teir neyðugu førleikarnar, ið einum tørvar fyri at gera arbeiðið til fulnar. Stýring er frælsi hjá einstaklingum at taka avgerðir, ið viðvíkja arbeiðinum og arbeiðsuppgávunum (Spector, 1997 í Staff 2002, s. 13).

Stýring og ávirkan verða sæð sum týdningarmikil viðurskifti í arbeiðinum, og eru ofta avgerandi fyri, um krøvini, einstaklingar møta, føra strongd við sær. At einstaklingurin sjálv(ur) kann taka avgerðir, og at einstaklingurin kann gera uppgávur, tí viðkomandi hevur neyðuga førleikan til tað, gevur einstaklinginum sjálvræði í arbeiðinum. Ì hesum sambandi verður einans hugsað um førleikan og myndugleikan hjá tí einstaka at stýra arbeiðinum hjá viðkomandi sjálvum og ikki við atliti at arbeiðinum hjá øðrum/starvsfeløgum.

Størri førleikar ein hevur, størri møguleikar hevur ein fyri at hava ávirkan á sítt arbeiði. Hetta merkir samstundis, at sjúkrarøktarfrøðingar við lítlum royndum ofta tørva/eru tengdar at góðum "rollumodellum" fyri at ogna sær neyðugar

førleikar soleiðis, at teir hava ávirkan og tamarhald á egnum arbeiði (Brenner, 1995).

### *Stuðul*

Innan arbeiðsumhvørvisgransking hevur leingi verið greitt, at góðir starvsfelagar og góð leiðsla hava stóran týdning fyri trivnaðin hjá tí einstaka í arbeiðinum. House (1981) sær stuðul (rættstundis) sum eitt tilfeingi hjá starvsfólkunum at arbeiða seg ígjøgnum strongd. Stuðul á einum arbeiðsplássi kann, sambært House (1981), umfata hesar fýra dimensjónirnar:

- At fáa umsorgan í arbeiðinum
- At fáa viðkomandi "feedback" um arbeiðið
- At fáa neyðugar upplýsingar um arbeiðið
- At fáa praktiska hjálp í arbeiðinum

Allir hesir formar fyri stuðli eru neyðugir, skal ein sjúkrarøktarfrøðingur trívast og mennast í starvinum.

Leiðsluviðurskifti og leiðsluháttur hava víst seg at hava stóran týdning fyri trivnaðin í einum starvi. At leiðslan greitt boðar frá, um ymisk viðurskifti, soleiðis at starvsfólkini kenna seg trygg (til dømis verða kunnað um størri broytingar í góðari tíð og fáa grundgevingar fyri broytingunum). Somuleiðis at tey kenna, at leiðslan ikki ger mismun, men stuðlar øllum starvsfólkunum og harumframt gevur sær stundir til at veita stuðul og feedback, tá tørvur er á tí. Hinvegin at veita starvsfólkunum “góð ráð”, tá tey ikki hava biðið um tað, kann gera ilt verri. Rættur og relevantur stuðul, rættstundis og á røttum stað er altavgerandi. Somuleiðis er umráðandi, at starvsfólkini fáa feedback frá leiðsluni - ikki einans tá tey gera nakað skeivt – men eisini soleiðis, at tey greitt vita, hvørjar teirra arbeiðsuppgávur eru, og um tey gera sítt arbeiði til lítar. Tað tykist, sum tað er týdningarmeiri at møguleikarnir fyri stuðli eru til staðar, heldur enn júst, at starvsfólkini fáa stuðul.

Eisini samsýning er ein avgerandi faktorur fyri trivnaðin. Teir vanligastu hættirnir at samsýna við eru løn, karrierumøguleikar og viðurkenning. Samsýning er ein sera umráðandi táttur fyri trivnaðin, tí hon snýr seg um rættvísi – um starvsfólkini kenna, at tey fáa hóskandi samsýning fyri gjørt arbeiði. Fáa tey ikki hóskandi samsýning og viðurkenning, vísir tað seg, at tey seta persónliga innsatsin niður, og hetta ávirkar sjálvsagt produktivitetin á arbeiðsplássinum.

## Framferðarháttur

### *Fyrimunir og vansar við ymiskum háttaløgum*

Grundleggjandi eru tey háttaløg, sum vit nýta innan samfelagsfrøðina býtt í tveir høvuðsbólkar – kvalitativar og kvantitativar kanningar. Í *kvalitativum* kanningarháttum savna vit inn og tulka tilfar út frá eitt nú samrøðum, tekstum og eygleiðingum. Hvat hevur týdning, kemur fram undir sjálvari viðgerðini av tilfarinum. Í *kvantitativum* kanningum verður frammanundan gjørt av, hvørjir spurningar hava týdning. Tí eru spurningarnir eisini skipaðir frammanundan, og endamálið er at seta tøl á (kvantifisera) veruleikan.

Í hesari kanning hava vit nýtt eina kvantitativa tilgongd. Hetta tí, at FFS vil hava eina heildarmeting av, hvussu víðfevndar ymiskar hugsanir og ymisk viðurskifti eru millum sjúkrarøktarfrøðingar á arbeiðsplássinum. Vit kunnu finna fram til, um tað eru serliga viðurskifti, sum eyðkenna partar av populasjónini[4] – til dømis teir, ið arbeiða um náttina, teir nýútbúnu, teir eldru o.s.fr. Styrkin er, at felagið fær eina greiða ábending um, hvørji viðurskifti ávirka trivnaðin hjá sjúkrarøktarfrøðingum og sostatt eisini eina greiða ábending um, hvørji fakfelagslig og politisk tiltøk felagið kann arbeiða fyri. Kanningin er sostatt eitt gott grundarlag fyri framhaldandi arbeiði hjá felagnum.

Ein vanligur kritikkur av tí kvantitativu tilgongdini er, at spurningarnir eru fastlagdir frammanundan og harvið eisini svarmøguleikarnir. Ein vandi er, at viðkomandi upplýsingar ikki eru við í kanningini. Tí hava vit eisini valt at geva

[4] Populasjón=felagsbólkur. Tað vil siga allir sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum.

teimum spurdu møguleikan at gera skrivligar viðmerkingar á aftasta blað í sjálvum spurnablaðnum. Undir viðgerðini verða hesar viðmerkingar nýttar í tann mun, teir lýsa viðurskifti, sum vit ikki fáa eina ábending um í hinum spurningunum og um viðmerkingarnar undirbyggja og dýpa lýsingina av teimum trimum faktorunum – krøv, ávirkan og stuðul .

Ofta er tað ein fyrimunur at nýta bæði spurnakanning og eina kvalitativa kanning. Tessvegna hava vit í fyrireikingunum til sjálva spurnakanningin valt at gera nakrar kvalitativar samrøður við sjúkrarøktarfrøðingar innan tey ymisku økini – t.e. heilsurøkt, heimarøkt og sjúkrahús. Vit hava lagt dent á, at báði sjúkrarøktarfrøðingar, sum arbeiddu í útjaðaranum og í miðstaðarøkjum vóru partur av teimum kvalitativu kanningunum. Í forkanningini løgdu vit dent á at nýta opnar spurningar og bólkasamrøður. Hetta er fyri at seta ljós á so nógv ymisk viðurskifti sum møguligt, sum hava ávirkan á trivnaðin hjá sjúkrarøktarfrøðingum. Harafturat hava vit kannað, hvussu arbeiðsumstøðurnar og trivnaðurin hjá sjúkrarøktarfrøðingum endurspeglast í almenna kjakinum við at leita í teimum føroysku bløðunum og á internetinum. Tað vísti seg skjótt, at sparingar, umleggingar og broytingar vóru afturvendandi evni í almenna orðaskiftinum.[5] Tilfarið hevur verið ein góð hjálp undir fyrireikingararbeiðinum til sjálva kanningina. Undir viðgerðini verður hetta tilfar nýtt í tann mun tað kann dýpa "røddina", ið kemur til sjóndar í sjálvari spurnakanningin.

### *Fylgibólkur*

Ein týdningarmikil partur av kanningini hevur verið, at ein fylgibólkur, sum FFS setti, hevur verið knýttur at arbeiðinum.

Uppgávan hjá fylgibólkinum hevur verið ymisk í teimum ymsu skeiðunum av arbeiðinum, men í høvuðsheitum hevur fylgibólkurin skula tryggjað, at tað lidna arbeiðið er "rætt og relevant".

Tað er altíð soleiðis, at tá fólk uttanífrá skulu seta seg inn í eitt stórt evni í lutfalsliga stutta tíð, kunnu tey misskilja okkurt, sum er ein sjálvfylgja fyri fólk,

[5] Sí notu 2 s. 9.

sum dagliga arbeiða innan økið. Tað hevur tí eisini verið ein uppgáva hjá fylgibólkinum at lúka møguligar villur og misskiljingar úr tilfarinum, áðrenn frágreiðingin endaliga er latin úr hondum.

### *Sundurgreining av krøvum, ávirkan og stuðli*

Fyri at skilja á hvønn hátt hugtøkini *krøv, ávirkan og stuðul* verða nýtt í viðgerðini av *trivnaðinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum í arbeiðinum*, fara vit her at greiða stutt frá, hvussu hugtøkini eru sundurgreinað í ymiskar dimensjónir og temu í spurnablaðnum og viðgerðini av øllum dátu.

Karasek & Theorell (1990: 64) lýsa *krøv* í arbeiðinum sum: "...the amount of disorganization in the work that the worker is required to place in an organized state." Tað er - sjálvsagt - trupult at máta tey krøv, sum fólk møta í teirra arbeiði. Hetta kemst millum annað av, at hugtakið kann býtast sundur í fleiri undirdimensjónir, og at arbeiðsumhvørvið er eitt samspæl ímillum tey ítøkiligu krøvini í arbeiðinum og einstaklingin. Ov stór og ov smá krøv kunnu vera eins tyngjandi fyri starvsfólkini. Hetta merkir, at tað er eins strongjandi, um tínir førleikar og evni ikki verða nýtt til fulnar, sum tá tú fært arbeiðsuppgávur ella byrður, tú ikki megnar.

Nøkur sereyðkenni við starvinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum eru tær fjøltáttaðu arbeiðsuppgávurnar og krøvini, ið sett verða frá ymiskum pørtum. Umframt at hava samband við sjálvan brúkaran/sjúklingin og starvsfelagar, skal sjúkrarøktarfrøðingurin eisini hava samband/samskifta við nógvar ymiskar fakbólkar, avvarðandi hjá brúkara/sjúklingi og ymiskar almennar stovnar. Harumframt koma krøv frá politisku myndugleikunum og almenninginum sum heild, umframt egnar ambisjónir. Í spurnablaðnum eru fleiri spurningar, sum handfara hesi evni:

- Er neyðugt at arbeiða skjótt
- Er arbeiðið kensluliga tyngjandi
- Er neyðugt at hava yvirlit yvir nógv ymiskt í senn
- Samstarv við aðrar fakbólkar og almennar stovnar

- Krøv frá brúkara
- Framtíðarvánir í arbeiðinum
- Mátin evni/førleikar verða nýttir

Karasek & Theorell leggja dent á, at tað ikki er arbeiðsnøgdin í sjálvum sær, sum skapar mistrivnað (og strongd), men at starvsfólkini ikki hava ávirkan á egnu arbeiðsumstøður, og hvussu tey leggja arbeiðið til rættis.

*Stýring og ávirkan* lýsa Karasek & Theorell sum, "...the worker's ability to control his or her activities and skill usage..."1990: 60). Tað vil siga, at ávirkan í arbeiðinum verður býtt sundur í tvær dimensjónir *førleikar* og *sjálvræði*. Sambandið millum ávirkan og førleikar kemst millum annað av, at vitan og førleikar (vanliga) geva okkum betri møguleikar at útinna okkara arbeiði nøktandi. Hava (ella fáa) starvsfólkini góðar møguleikar at mennast fakliga (eftirútbúgving, førleikamenning, "on-the-job-learning," víðari útbúgving v.m.), fáa tey samstundis betri møguleikar at útinna og taka ábyrgd av arbeiðsuppgávunum. Hetta økir trivnaðin. Hinvegin, kenna starvsfólkini, at teirra vitan og førleikar ikki verða nýtt ella tey hava ov lítið at gera, økir hetta eisini strongd og mistrivnað.

Sjúkrarøktarfrøðingar hava ikki altíð møguleika at ávirka arbeiðsnøgd og ferð/skjótleika í arbeiðinum. Oftani verða fólk innløgd á sjúkrahús akutt, ella serligar umstøður koma í hjá brúkarum/sjúklingum, soleiðis at arbeiðstrýstið og eksternu krøvini økjast í mun til tann einstaka sjúkrarøktarfrøðingin.

Fyri at kanna ávirkan, ábyrgd og menningarmøguleikar á arbeiðsplássum hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum, er tískil neyðugt at spyrja um:

- Arbeiðsumhvørvið er fakliga kveikjandi og spennandi
- Arbeiðsumhvørvið er eyðkent av stagnasjón
- Hvussu starvsfólkini meta, at teirra førleikar verða nýttir
- Møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving eru nøktandi
- Starvsfólkini hava ávirkan á vaktarskipan

- Starvsfólkini hava ávirkan á nøgd av arbeiði
- Hvussu starvsfólkini trívast við at arbeiða í vaktum
- Tal av starvsfólkum er í samsvar við tal av brúkarum/sjúklingum

Samanumtikið kunnu vit siga, at menningarmøguleikar og ávirkan eru sera neyvt tengd at hvørjum øðrum. At skerja ella avmarka menningarmøguleikar hjá starvsfólkinum er eisini ein háttur at útinna vald. Karasek & Theorell (1990: 58-61) leggja dent á, at vitan, førleikar og ávirkan í arbeiðinum gang í takt – broytir tú eitt, ávirkast hitt.

At enda fara vit at greiða frá, hvussu hugtakið *stuðul* er sundurgreinað og nýtt í spurnablaðnum og undir viðgerðini. Teir spurningar, ið skulu lýsa hesa dimensjónina eru um leiðsluviðurskifti, samstarv, menningarmøguleikar, trivnað sum heild og supervisjón (professjonellur stuðul). Trivnaðurin á einum arbeiðsplássi sum heild kann vera góður, hóast nógvir trupulleikar í dagliga arbeiðinum. Vit spyrja millum annað um:

- Hjálp og stuðul frá starvsfeløgum
- Um starvsfelagir og leiðsla eru til reiðar at lurta eftir trupulleikum í arbeiðinum hjá teimum (sjúkrarøktarfrøðingunum)
- Um teir kenna seg sum partur av einum felagsskapi
- Samstarv við aðrar fakbólkar
- Ósemjur á arbeiðsplássinum
- Hvussu leiðslan raðfestir trivnað, dugir at loysa konfliktir og leggja arbeiðið til rættis
- Kunning um týdningarmiklar avgerðir, broytingar og framtíðarætlanir í góðari tíð

Sum heild kunnu vit siga, at ávirkan á egnu arbeiðsumstøður og stuðul eru linnandi faktorar, eins og manglandi ávirkan og stuðul kunnu viðføra strongd og/ella at starvsfólkini ikki megna at røkja teirra arbeiði. Tað hevur víst seg, at um vánaligt arbeiðsumhvørvi ikki broytist til tað betra, setur tað eina ónda

ringrás í gongd á arbeiðsplássinum, har strongd, overving og mistrivnaður savnast.

### *Bygnaður av spurnablaði og umboðan*

Spurnabløð vóru send út til allar limirnar hjá FFS undantikið teimum eftirløntu. Í alt vóru 746 spurnabløð send út. Av teimum komu 414 spurnabløð innaftur - t.v.s. at svarprosentið er 55. Av teimum 746 eru 96 passivir limir. Hugsast kann, at limir í felagnum, ið hava verið leingi frá starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur, hava valt ikki at svara. Tað hevur ikki verið møguligt at sálda teir passivu limirnar frá.

Vit meta, at svarprosentið er nøktandi og umboðandi fyri limirnar hjá FFS, tí at býtið av innkomnum spurnabløðum samsvarar væl við lutvísa býtið av arbeiðs- og bústaðarøki hjá limunum í FFS. Sí eisini talvu 1 niðanfyri, sum greinar, hvussu býtið av svarprosenti er í mun til arbeiðs- og bústaðarsøki.

Tann stóra avbjóðingin í spurnablaðnum er at fáa tað so viðkomandi fyri allar sjúkrarøktarfrøðingar innan øll tey ymisku arbeiðsøkini sum gjørligt og samstundis at gera kanningina sambæriliga við kanningar uttanlands. Fyri so vítt gjørligt at náa hesum máli vórðu samrøður gjørdar við sjúkrarøktarfrøðingar innan tey ymisku arbeiðsøkini (sjúkrahús, eldrarøkt og heilsurøkt) og runt um í Føroyum (Klaksvík, Eysturoy, Tórshavn og Suðuroy). Spurningarnir í spurnablaðnum eru í tráð við aðrar trivnaðarkanningar. Áðrenn spurnablaðið varð sent út, varð tað eisini royndarkoyrt við bólkum av sjúkrarøktarfrøðingum, og latið fylgibólkinum til viðmerkingar. Tær viðmerkingar, sum komu, vórðu viðgjørdar, og nakrar smávegis broytingar gjørdar í spurnablaðið, áðrenn tað bleiv sent út til limirnar.

Í fylgibrævinum til spurnablaðið varð dentur lagdur á, at tað var navnloynt. Einki einstakt spurnablað verður sjónligt í sjálvari kanningini, tí at tað er heildin, sum er áhugaverd. Hetta er umráðandi fyri trúvirðið í kanningini.

Av innkomna tilfarinum sæst, at býtið av teimum svaraðu spurnabløðunum í mun til geografiskt øki og arbeiðsøki samsvarar væl við veruliga býtið av

limunum hjá FFS (sí annars talvu 1 niðanfyri). Hetta styrkir um validitetin av kanningini.

Niðurstøðan er sostatt, at kanningin er nøktandi tilfar til at meta um trivnaðin millum sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum. Tó skal havast í huga, at kanningin er ikki ein eintýðugur svarlisti, men skal vera støði undir kjak um trivnaðin og menning/loysnir.

### *Dátuinnsavning og viðgerð*

Býtið av svarprosenti í mun til arbeiðsøki og geografiskt øki er sum tilskilað í talvuni niðanfyri.

**Talva 1: Býti av svarprosenti í mun til bústaðar- og arbeiðsøki**

| | | Tal av limum | Í %[6] | Svarað spurnabløð | Í %[7] |
|---|---|---|---|---|---|
| **Bústaður** | | | | | |
| | Norðoyggjar | 76 | 10 | 46 | 11 |
| | Eysturoy | 92 | 12 | 61 | 15 |
| | Streymoy annars | 52 | 7 | 34 | 8 |
| | Suðurstreymoy | 355 | 48 | 203 | 49 |
| | Vágar | 21 | 3 | 17 | 4 |
| | Sandoy | 11 | 1 | 6 | 1 |
| | Suðuroy | 59 | 8 | 41 | 10 |
| | Vantar/Ikki svarað | | | 6 | 1 |
| | Annað[8] | 80 | 11 | | |
| **Tilsamans** | | 746 | 100 | 414 | 100 |
| **Arbeiðsøki** | | | | | |
| | Sjúkrahús | 352 | 47 | 235 | 57 |
| | Heilsurøkt | 27 | 4 | 23 | 6 |
| | Ellis/Røktarheim | 86 | 12 | 54 | 13 |
| | Heimarøkt | 59 | 8 | 50 | 12 |
| | Sambýli o.t. | 5 | 1 | 5 | 1 |
| | Læknaviðtala | 10 | 1 | 10 | 2 |
| | Undirvísing/Ráðgeving | 23 | 3 | 16 | 4 |
| | Annað øki | 17 | 2 | 16 | 4 |
| | Vantar/Ikki svarað | | | 5 | 1 |
| | Annað[9] | 167 | 22 | | |
| **Tilsamans** | | 746 | 100 | 414 | 100 |

[6] Í mun til samlaða talið av limum undantikið eftirløntir limir.
[7] Í mun til svarað spurnabløð.
[8] Hetta kann vera hvílandi limir, fólk sum eru í farloyvi ella skifta arbeiði v.m. Slík tøl eru altíð ein meting, tí at arbeiðsmegin flytur.
[9] Her kann vera talan um hvílandi limir, tímalønt og limir sum eru í barnsburðarfarloyvi. Teir limir, sum eru tímaløntir, eru ikki skrásettir hjá FFS sum arbeiðandi innan eitt ávíst arbeiðsøki.

Fyrsti parturin av dátuinnsavningini hevur verið at gera og senda spurnablaðið út til limirnar. Sum nevnt omanfyri, so bleiv tað sent út til allar limir í FFS undantikið teir eftirløntu – tilsamans 746 í tali. Tølini fyri limirnar hjá FFS í talvu 1 (omanfyri) eru sambært upplýsingum og uppgerð frá felagnum.

Samrøður og fundir hava havt til endamáls at greina og fáa greiði á, hvørji evni vit skuldu leggja serligan dent á í kanningini. Harafturat hava vit eisini kannað – og fingið íblástur – frá líknandi útlendskum kanningum. Hetta ger, at partar av kanningini kunnu samanberast við útlendsk viðurskifti.

Um so er, at fólk eru í farloyvi, sjúkrameldað, arbeiðsleys o.t. er viðkomandi biðin um at svara spurnablaðnum út frá teimum royndum, viðkomandi hevur frá tí arbeiðsplássi, hann er í farloyvi, sjúkrameldað frá ella seinasta arbeiðspláss, hann var á. Í samband við "annað" undir arbeiðsøki, kann vera talan um heilt annað fakøki ella øki, har sjúkrarøktarfrøðingar og/ella aðrir fakbólkar starvast. Eftir at spurnabløðini vóru komin aftur, vórðu tey bólkað og svarini tøppað inn í telduforritið NSD-stat – eitt statistikktelduforrit.

## 2. Partur: Lýsing av starvinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum

## Eyðkenni við starvinum

*"… Hetta er eitt specielt fak, ósjónligt til ein sjálvur ella avvarðandi verða sjúk/óhjálpin. Okkara arbeiðs- og ábyrgdarøki er stórt, fjølbroytt og diffust (ringt at definera til fulnar). Okkara arbeiði varierar frá at vera fullkomiliga sjálvstøðugur til at vera bundin av samstarvi við fleiri fakbólkar umframt okkara egna fakbólki. Okkara arbeiði yvirlappar økið hjá øðrum fakbólkum. Alt hetta kann skapa trupulleikar, serliga tá „øll vilja ráða" og "halda seg vita best"* (SRF, 35-44 ár).[10]

Í teimum innleiðandi samrøðunum kom fram, at sjúkrarøktarfrøðingar halda tað vera torført at seta orð á, hvat teir gera. Fyri at lýsa arbeiðið hjá sjúkrarøktarfrøðingum hava vit valt at býta lýsingina upp í viðurskifti, ið eru tengd at *nærumhvørvinum* og viðurskifti, ið eru tengd at *fjarumhvørvinum*. Hugtøkini nærumhvørvi og fjarumhvørvi eru nýtt fyri at vísa frástøðuna sum sjúkrarøktarfrøðingurin hevur til tey krøv, ið verða sett til starvið. Á mynd 1 eru hesi viðurskifti teknað við sjúkrarøktarfrøðinginum í miðjuni. Myndin vísir, hvussu nógvar ymiskar bólkar sjúkrarøktarfrøðingurin skal fyrihalda seg til í tí dagliga, og hvaðani krøvini koma. Innari ringurin vísir, hvaðani krøvini til sjúkrarøktarfrøðingin í nærumhvørvinum koma. Uttari ringurin vísir, hvaðani krøvini frá fjarumhvørviðnum koma. Størri frástøðan er frá teimum, sum seta krøvini, minni møguleikar hevur sjúkrarøktarfrøðingurin fyri at ávirka krøvini í tí dagliga arbeiðinum. Meðan sjúkrarøktarfrøðingurin møguliga hevur ávirkan á viðurskifti í nærumhvørvinum, so hevur hann lítla og onga ávirkan á tey krøv, sum koma uttanífrá úr fjarumhvørvinum.

[10] SRF=sjúkrarøktarfrøðingur

**Mynd 1: Lýsing av nærumhvørvinum og fjarumhvørvinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum**[11]




## Nærumhvørvið hjá sjúkrarøktarfrøðinginum

Innast á myndini er sjúkrarøktarfrøðingurin. Við starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur fylgja nakrar etiskar skyldur. Grundleggjandi ábyrgdarøki hjá sjúkrarøktarfrøðingum er at:

- At fremja heilsu
- At fyribyrgja sjúku
- At endurskapa heilsu
- At linna líðingar

Innan hesi øki hevur sjúkrarøktarfrøðingurin skyldu at nýta og betra sína vitan og dygdir.[12]

[11] Almennar stovnar eru t.d. sjúkrahús, ellis- og røktarheim, skúlar, sernámsdepil, apotek, heilsufrøðiliga starvsstovan, v.m. Aðrir fakbólkar eru t.d. læknar, laborantar, fysio – og ergoterapeutar, jarðarmøður, heilsuhjálparar, sjúkrarhjálparar, v.m.

Fyri sjúkrarøktarfrøðingin er brúkarin/sjúklingurin miðdepilin. Sjúkrarøktarfrøðingurin skal samskipa alla røkt rundan um brúkaran/sjúklingin. Hann skal hava yvirlit og er tann, sum samlar allar træðrirnar saman og er millumlið millum brúkaran/sjúklingin, aðrar fakbólkar og tey nærmastu.

Aðaluppgávurnar hjá sjúkrarøktarfrøðinginum eru at arbeiða heilsufremjandi og fyribyrgjandi. Hetta ger hann við at hava umsorgan, stuðla og læra brúkaran/sjúklingin, tey avvarðandi ella samfelagið. Sjúkrarøktarfrøðingurin arbeiðir fyribyrgjandi við at eygleiða ikki bert sjúka partin av likaminum, men eisini at leggja merki til, um brúkarin/sjúklingurin hevur onnur sjúkutekin. Arbeiðsøkið er sera vítt og umfatar ymisk sløg av viðgerðum, herundir likamligar og sálarligar viðgerðir. Brúkararnir/sjúklingarnir eru í øllum aldri og í ymiskum støðum. Her er talan um brúkarar/sjúklingar, ið eru likamliga ella sálarliga soleiðis fyri, at teimum tørvar sjúkrarøkt. Nevnast kunna t.d. misnýtarar, brúkarar/sjúklingar, ið hava tørv á sjúkrarøkt innan styttri og longri tíðarskeið, og brúkarar/sjúklingar, ið hava viðvarandi tørv.

Í nærumhvørvinum skal sjúkrarøktarfrøðingurin samstarva, samskifta og samskipa arbeiðið við nógvar ymiskar bólkar, t.d. brúkarar/sjúklingar, starvsfelagar, leiðslu, aðrar starvsbólkar og avvarðandi at brúkarum/sjúklingum.

Grundleggjandi er starvið sum sjúkrarøktarfrøðingur tað sama uttan mun til, í hvørjum øki í heilsuverkinum hann arbeiðir. Tó eru umstøðurnar, samstarv við aðrar fakbólkar og brúkarar/sjúklingar ymiskir alt eftir hvørjum øki, sjúkrarøktarfrøðingurin arbeiðir í. Vanliga verður skilt ímillum *primer-* og *sekunderøkið,* har primerøkið er økið uttan fyri sjúkrahúsini og sekunderøkið er inni á sjúkrahúsinum.

Innan primerrøkt hava vit sjúkrarøktarfrøðingar í heimarøktini, heilsufrøðingar og sjúkrarøktarfrøðingar, sum starvast hjá kommunulækna, á ellis- og røktarheimi, sambýlum og tílíkum. Arbeiðsumhvørvið hjá sjúkrarøktarfrøðingum í heimarøktini og heilsufrøðingum er øðrvísi á tann hátt, at teir arbeiða nógv einsamallir og skulu ferðast nógv millum

[12] Sí annars brot úr etisku leiðreglunum fyri sjúkrarøktargransking í norðanlondum www.sff.fo

brúkarar/sjúklingar. Teir eru tí í størri mun bundnir av bili og fartelefon fyri at kunna ferðast ímillum og samskifta við brúkararnar/sjúklingarnar. Í dagliga arbeiðinum er neyðugt hjá teimum at samstarva við aðrar almennar stovnar, sum kunna liggja langt burtur frá økinum, har teir eru settir at arbeiða.

Innan sekunderøkið eru sjúklingar/brúkarar savnaðir á einum stað. Sjúkrarøktarfrøðingurin hevur fleiri starvsfelagar, sum hann er saman við í dagligdegnum. Hann hevur samband (andlit til andlits) við fleiri fakbólkar, ið allir eru um sjúklingin.

### *Arbeiðstíðir og karmar í arbeiðinum*

Starvið sum sjúkrarøktarfrøðingur fevnir um allar tíðir á degnum, alt árið runt. Hetta merkir, at sjúkrarøktarfrøðingar ofta mugu arbeiða, tá nógv onnur hava frí, og kann hetta ávirka trivnaðin. Tó so er hetta nakað, sum fylgir við starvinum. Eitt annað, sum fylgir við starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur er, at tað hendir nógv óvæntað í arbeiðinum, har teir muga veita bráðfeingis hjálp/umsorgan, og tá ber ikki so væl til at hugsa um arbeiðstíð og arbeiðsnøgd.

**Mynd 2: Arbeiðstíðir hjá sjúkrarøktarfrøðingum**




Sp.: *Hvørja vakt hevur tú vanliga í tínum arbeiði?*

Av teimum, sum hava tikið lut í hesi kanning, arbeiða 50% í skiftandi vaktum, 39% arbeiða bert á dagvakt. Tað eru einans 2%, sum bara arbeiða náttarvakt, og 6% sum bara arbeiða kvøldvakt. Hvørja vakt, sjúkrarøktarfrøðingar arbeiða, og í hvønn mun teir sjálvir kunna stýra sínum arbeiðsdegi, hevur ávirkan á trivnaðin. Kanningar uttanlands vísa, at sjúkrarøktarfrøðingar trívast ofta sera illa við at

arbeiða náttarvakt, og harumframt er tað at arbeiða náttarvakt heilsuskaðiligt.[13] Okkara tøl benda eisini á, at teir, sum arbeiða á náttarvaktini, ikki eru so væl nøgdir við tað. Einans 10% av sjúkrarøktarfrøðingum siga seg trívast væl ella sera væl við at arbeiða náttarvakt. Mynd 3 vísir, at 20% siga seg trívast nøkulunda, meðan 35% siga seg trívast illa ella sera illa við at arbeiða náttarvakt. 35% arbeiða ikki náttarvakt.

**Mynd 3: Náttarvaktir og trivnaður**




Sp.:*Hvussu trívist tú við at arbeiða náttarvakt?*

Í spurnablaðnum varð spurt, hvussu nøgdir sjúkrarøktarfrøðingarnir vóru við fysisku karmarnar, og í hvønn mun teir høvdu tey amboð, t.d. bil og fartelefon, sum teir høvdu brúk fyri.

Mynd 4 og 5 vísa, at umleið helvtin (ávikavist 55% og 53%) av øllum sjúkrarøktarfrøðingum eru nøgdir í stóran ella í ávísan mun við karmar og amboð, teir hava brúk fyri í starvinum. Hinvegin eru tað ávikavist 45% og 40% av teimum, sum eru nøgdir í minni mun ella als ikki við karmarnar og amboðini í arbeiðinum.

[13] Davis, S, et al.: “Night shift work, light at night, and risk of breast cancer, J Natl Cancer Inst 2001;93(20):1557-1562; Bøggild H, et al:”Work environment of Danish shift and day workers”. Scand J Work Enivon Health 2001; 27:97-105

**Mynd 4: Fysiskir karmar og nøgdsemi**




Sp.: *Hvussu vilt tú lýsa arbeiðsumhvørvið? Teir fysisku karmanir eru nøktandi*

**Mynd 5: Amboð og nøgdsemi**




Sp.: *Hvussu vilt tú lýsa arbeiðsumhvørvið? Tey amboð tel., telda v.m.) tey tørvar eru nøktandi*

Tað er ymiskt, hvussu bundnir sjúkrarøktarfrøðingarnir eru av amboðum í arbeiðinum. Eitt nú eru sjúkrarøktarfrøðingar í heimarøktini og heilsufrøðingar serliga bundnir av amboðum, sum t.d. bili og fartelefon. Mynd 6 og mynd 7 vísa nøgdsemið við karmar og amboð í mun til arbeiðsøki. Her sæst munur millum tey ymisku arbeiðsøkini. Sjúkrarøktarfrøðingar, sum arbeiða innan læknaviðtalu, heimarøkt, ellis/røktarheim og sjúkrahús eru betri nøgdir við fysisku karmarnar enn teir, sum arbeiða innan heilsurøkt, sambýli o.t. og undirvísing og ráðgeving. Sjúkrarøktarfrøðingar, sum arbeiða innan undirvísing og ráðgeving og innan sambýli o.t. eru væl nøgdir við amboðini, teir hava í arbeiðinum, hóast færri enn 20% av teimum eru nøgdir í stóran mun og í ávísan mun við karmarnar í arbeiðinum. Innan heilsurøkt vísa myndirnar, at ávikavist 61% og 70% av sjúkrarøktarfrøðingunum einans eru nøgdir í minni mun ella als ikki við karmarnar og amboðini, teir hava í arbeiðinum.

**Mynd 6: Arbeiðsøki og nøgdsemi við karmar**




Sp.: *Hvussu vilt tú lýsa arbeiðsumhvørvið? Teir fysisku karmanir eru nøktandi*

**Mynd 7: Arbeiðsøki og nøgdsemi við amboð**




Sp.: *Hvussu vilt tú lýsa arbeiðsumhvørvið? Tey amboð (bilur, tel., telda v.m.) tær tørvar eru nøktandi*

Í samrøðunum, sum gjørdar vóru í mai mánaði, kom eisini fram, at tað er misjavnt, hvussu karmarnir hjá heilsufrøðingum eru, og at amboðini, teir hava í arbeiðinum ikki eru nøktandi. Orsøkirnar til hetta eru m.a., at ógreitt er, um tað er landið ella kommunan, ið hevur ábyrgdina av fysisku karmunum og amboðum í arbeiðinum. Hetta ger, at karmarnir eru ymiskir, alt eftir hvussu stóran leiklut kommunan hevur valt at taka í hesum føri. Avleiðingarnar av

hesum eru, at borgarar fáa ymiskar sømdir viðvíkjandi hesi tænastu, alt eftir hvar í landinum teir búgva. At karmar og amboð ikki eru tøk, ger tað eisini trupult hjá heilsufrøðingunum at arbeiða og veita ta tænastu, sum brúkarin/sjúklingurin hevur rætt til.

## Fjarumhvørvið hjá sjúkrarøktarfrøðinginum

Í fjarumhvørvinum eru tey viðurskiftini, sum ávirka starvið og trivnaðin hjá sjúkrarøktarfrøðinginum, men sum sjúkrarøktarfrøðingurin hevur lítla ávirkan á. Her verður hugsað um samfelagsgongdina, politisku myndugleikarnar, aðrar fakbólkar, fjølmiðlar og almennar stovnar.

Politiskar avgerðir ávirka og seta krøv til sjúkrarøktarfrøðingin. Politisk viðurskifti eru skiftandi, og arbeiðið kann kennast sera ótrygt, um tað verður ov nógv tengt at politiskum avgerðum. Ein sjúkrarøktarfrøðingur lýsir tað soleiðis:

*"Tann politiski mynduleikin manglar at melda klárt út hvørjar tænastur vit skulu veita sjúklingum í Føroyum, og hvørjar vit ikki kunnu veita... Málini innan heilsuverkið eru alt ov ógreið og speglar tað av í dagliga virkinum, Hvør fuglur syngur við sínum nevið. Tað hevði verið gott við A-kreditering, so vit fingu fleiri góðkendar mannagongdir"* (SRF, 45 ár).

Fjølmiðlar fáa alsamt størri leiklut í samfelagnum, og tann økta kunningin, sum fylgir við hesum, setir eisini størri krøv til sjúkrarøktarfrøðingin. Samstundis eru fjølmiðlarnir ein miðil, har sjúkrarøktarfrøðingar kunna ávirka samfelagið og politiskar avgerðir.

Í spurnablaðnum verður spurt um í hvønn mun sjúkrarøktarfrøðingar halda, at almenningurin og politiski myndugleikin hava virðing fyri starvinum sum

**Mynd 8: Almenna virðingin fyri starvinum**




Sp.: *Hvussu heldur tú, at arbeiði tú gert sum sjúkrarøktar-frøðingur sum heild, verður virðismett av almenninginum?*

sjúkrarøktarfrøðingur. Á mynd 8 sæst, at 66% av sjúkrarøktarfrøðingunum meta, at almenningurin virðismetir arbeiðið hjá sjúkrarøktarfrøðingum í stóran ella í ávísan mun. Hetta sama er ikki galdandi fyri politisku myndugleikarnar. Einans 2% av sjúkrarøktarfrøðingunum halda, at arbeiðið sum sjúkrarøktarfrøðingur verður virðismett av politisku myndugleikunum í stóran mun, meðan nærum ein triðingur (27%) eru avgjørdir og halda, at politiski myndugleikin als ikki virðir arbeiðið hjá sjúkrarøktarfrøðingum.[14] Skrivligu viðmerkingarnar í spurnablaðnum lýsa eisini, hvussu lítla virðing sjúkrarøktarfrøðingar kenna seg fáa frá politisku myndugleikunum. Her er eitt dømi um eina, sum tekur so rívan til:

**Mynd 9: Virðingin frá politisku myndugleikunum**




Sp.:*Hvussu heldur tú, at arbeiði tú gert sum sjúkrarøktar-frøðingur sum heild, verður virðismett av myndugleikunum?*

*"So leingi sjúkrarøktin er ein kvinnuverð, og politiski mynduleikin er ein mannfólkaverð, vil sjúkrarøktin blíva lágt mett av tí politiska mynduleikanum. Men tá politikarin liggur sjúkur í songini, tá er hann eymjúkur og takksamur fyri tað umsorgan og hjálp, vit veita honum. Men tað røkkur tó ikki til at hækka náttarviðbótina frá teim lúsa 25 kr. sum vit fáa eyka um tíman. Náttarvakt, tað er eitt undirlønt starv so tað forslær"* (SRF 39-49 ár).

[14] Sambært aðrari kanning av, hví tað er trupult at rekruttera høgt útbúna arbeiðasmegi til fiskivinnuna í Føroyum, so er ein forðing ónøgdsemi við eina politiska skipan, sum partvíst arbeiðir rættiliga stuttskygt og partvíst fyrikemur at vera óstøðug. (Hovgaard og West, 2003: 24)

## Samandráttur

Kanningin vísir, at helmingurin av sjúkrarøktarfrøðingum arbeiða í skiftandi vaktum. Okkara tøl benda á, at teir ikki eru so glaðir fyri náttarvaktina. Meira enn ein triðingur siga seg trívast illa ella sera illa við at arbeiða náttarvakt.

Umleið helvtin av sjúkrarøktarfrøðingum eru nøgdir við fysisku karmarnar og amboðini, meðan umleið helvtin eru ónøgdir. Sjúkrarøktarfrøðingar, ið arbeiða innan læknaviðtalu, heimarøkt, ellis/røktarheim og sjúkrahús eru betri nøgdir við fysisku karmarnar enn teir, sum arbeiða innan heilsurøkt, sambýli o.t. og undirvísing og ráðgeving. Kanningin vísir, at tey, sum arbeiða innan undirvísing og ráðgeving eru serliga væl nøgd við tey amboð (bilur, fartelefon, telda, v.m), tey hava í arbeiðinum, meðan tað serliga eru heilsufrøðingarnir sum eru ónøgdir við hesi viðurskifti.

Ein meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingum meta, at teirra starv í stóran ella ávísan mun verður virðismett av almenninginum. Hinvegin so halda meira enn tveir triðingar av sjúkrarøktarfrøðingum, at teirra starv einans í minni mun ella als ikki verður virðismett av politisku myndugleikunum.

# 3. Partur: Nøgdsemi millum sjúkrarøktarfrøðingar

## Nøgdsemi sum heild

Í ástøðiliga partinum varð nevnt, at trivnaður kann lýsast sum ein almenn kensla av trivnaðinum sum heild í arbeiðinum ella í pørtum av arbeiðinum. Vit fara nú at hyggja at nøgdseminum hjá sjúkrarøktarfrøðingum í arbeiðinum sum heild, um nøgdsemið er broytt seinnu árini og í hvønn mun sjúkrarøktarfrøðingar umhugsa at søkja annað starv.

**Mynd 10: Nøgdsemi við arbeiðið sum heild**




Sp.:*Ert tú sum heild nøgd í tínum arbeiði?*

Nøgdsemi verður sæð sum eitt gott mát fyri trivnaðin á arbeiðsplássinum. Tað sigur nakað um, hvussu tað gongur á arbeiðsplássinum. Um nøgdsemið sum heild ikki er gott, so kann tað vera eitt tekin um, at alt ikki er í lagi á arbeiðsplássinum.

Spurnakanningin vísir, at sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum eru sum heild væl nøgdir við starvið. Myndin vísir, at heili 79% av sjúkrarøktarfrøðingum sum heild eru í stóran ella ávísan mun nøgdir við sítt starv.[15] Tó so standa hesi tøl ikki einsamøll í spurnakanningini, tí onnur tøl benda á, at trivnaðurin er minkaður seinastu árini.

**Mynd 11: Nøgdsemið er broytt til tað verra**




Sp.:*Er títt nøgdsemi við arbeiði broytt seinnu?*

[15] Ein kanning sum Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi fyri Lærarafelagið í 2002 vísti, at 75% av lærarum vóru í stóran ella ávísan mun nøgdir sum heild við sítt starv (Mortensen, 2002).

Fyri at stuðla undir spurningin um nøgdsemi sum heild, varð spurt um nøgdsemið er broytt seinnu árini.

Í spurninginum, um nøgdsemið er broytt seinnu árini, siga 41% av sjúkrarøktarfrøðingum, at tað er broytt til tað verra. 26% halda nøgdsemið vera óbroytt, meðan 16% halda at nøgdsemið er broytt til tað betra.

Í kanningini er eisini spurt, hvørji viðurskifti hava ávirkað arbeiðsumstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum, og hesir spurningar kunnu brúkast sum grundarlag til at siga nakað um, hví so nógvir halda, at nøgdsemið er broytt til tað verra. Kanningin vísir, at ein stórur partur av sjúkrarøktarfrøðingunum halda, at yvirtøkur og bygnaðarbroytingar innan heilsuverkið, eru tiltøk, sum hava broytt arbeiðsumstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingunum til tað verra.

**Talva 2: Arbeiðsumstøðurnar eru broyttar til tað verra**

| | Til tað betra | Óbroytt | Til tað verra | Veit ikki | N= |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu heldur tú, at yvirtøkur av viðgerðum innan heilsuverkið hava broytt umstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum? | 9% | 6% | 31% | 54% | 402 |
| Hvussu heldur tú, at umleggingarnar innan heilsuverkið hava broytt arbeiðsumstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum? | 6% | 6% | 52% | 36% | 401 |

### *Fleiri umhugsað at søkja annað starv*

Tað eru eisini onnur úrslit í kanningini, sum benda á, at hóast nøgdsemið sum heild er gott, so eru viðurskifti, sum teir eru ónøgdir við. Eitt annað gott mát fyri trivnað er, um starvsfólk umhugsa at søkja annað starv, og hví tey gera so.

**Mynd 12: Umhugsað at søkt annað starv**




Sp.:*Hevur tú av álvara umhugsað at søkja annað starv?*

Heili 60% av sjúkrarøktarfrøðingum umhugsa at søkja annað starv. 17% av teimum, sum umhugsa at søkja annað starv, siga, at eingir møguleikar eru fyri øðrum starvi innan teirra serøki. Hesi tøl eru rættiliga høg, og tí er áhugavert at vita, hví sjúkrarøktarfrøðingar ynskja annað starv.

Tey flestu, sum ynskja annað starv, vísa á, at tey ynskja at royna nakað nýtt ella at fáa nýggjar avbjóðingar.[16] Helmingurin (50%) av sjúkrarøktar-frøðingunum siga orsøkina vera, at arbeiðið er ov strævið, at tað eru ov nógvar ósemjur, og at tað er orsakað av viðurskiftum við starvsfelagar. Onnur 15% umhugsa at søkja annað starv av heilsu- ella familjuávum.

**Mynd 13: Orsøkir til at tey umhugsa at søkja annað starv**




Sp.:*Hví hevur tú umhugsað at søkt annað starv?*

[16] Legg til merkis, at tey kundu velja ymisk viðurskifti og tí verður samlaða talið ikki 100%

## Tað góða arbeiðið

### *Hvat er eitt gott arbeiði?*

Sum víst á omanfyri, so er trivnaðurin á einum arbeiðsplássi eitt úrslit av møtinum millum einstaklingin (í hesum føri tann einstaka sjúkrarøktarfrøðingin) og arbeiðsumhvørvið (t.e. arbeiðspláss/øki, har sjúkrarøktarfrøðingurin

starvast). Í kanningum sum hesari er tí umráðandi at fáa eina ábending um, hvørji viðurskifti sjúkrarøktarfrøðingar leggja dent á í arbeiðslívinum sum heild. Vit bóðu teir lýsa, hvat eyðkennir eitt gott starv. Teir kundu velja millum átjan ymisk viðurskifti og skuldu raðfesta, hvørji fimm vóru mest týðandi. Úrslitið av hesum spurningi sæst niðanfyri.[17]

**Mynd 14: Tað góða arbeiðið**




Sp.: *"Tað góða arbeiðið" - hvat merkir tað fyri*

[17] Legg til merkis, at tey kundu velja fimm ymisk viðurskifti, og tí verður samlaða talið ikki 100%.

Vert er at leggja til merkis, at tveir triðingar (67%) raðfesta góða leiðslu millum tey mest týðandi viðurskiftini, tá tey skulu lýsa, hvat tað góða arbeiðið merkir fyri tey. Góð løn og dámligir starvsfelagir hava eisini stóran týdning fyri sjúkrarøktarfrøðingar. Áhugavert er, at 41% av sjúkrarøktarfrøðingum raðfesta spennandi og krevjandi avbjóðingar høgt, tá talan er um tað góða arbeiðið. Hetta samsvarar eisini væl við, at nógvir av teimum umhugsa at søkja annað starv fyri at fáa nýggjar avbjóðingar.

Nógv ymisk viðurskifti hava sjálvsagt týdning fyri, hví ein so stórur partur av sjúkrarøktarfrøðingum raðfesta góða leiðslu so høgt. Nógvar umleggingar og broytingar innan heilsuverkið eru farnar fram tey seinastu tíggjuárini. Tær kreftir, sum eyðkenna samfelagið sum heild í dag, seta eisini størri/onnur krøv til leiðslur í heilsuverkinum. Ein orsøk til, at sjúkrarøktarfrøðingar leggja so stóran dent á góða leiðslu kann vera, at øktu krøvini geva spenningar millum leiðslu og sjúkrarøktarfrøðingar. Einans 3% raðfesta møguleika fyri at koma í hægri starv millum fimm tey mest týðandi viðurskiftini.[18] Hugsast kann, at sjúkrarøktarfrøðingar leggja størsta dentin á at kunna veita sjúkrarøkt og ikki á karrieru í vanligum týdningi. Harumframt spælir tað sjálvsagt eisini inn, at leiðslustørv innan heilsurøkt eru fá og kanska heldur ikki so lokkandi.

Áhugavert er eisini, at einans 13% halda, at tað er av stórum týdningi, at samanhangur er millum arbeiði og frítíð og einans 9%, at tað er umráðandi at arbeiði í somu bygd/øki, har teir búgva.

[18] Limakanningin av trivnaðinum hjá lærarum í fólkaskúlanum vísti eisini, at einans 3% av lærarum raðfestu møguleikan fyri at koma í hægri starv millum fimm tey mest týðandi viðurskiftini (Mortensen, 2002).

### *Tað góða arbeiðið og nøgdsemi*

At onnur viðurskifi enn samsvar millum arbeiði og frítíð í arbeiðslívinum hava stóran týdning fyri sjúkrarøktarfrøðingar, síggja vit á myndunum 15 og 16. Sum sæst á mynd 15, so siga heili 96%, at arbeiðið í stóran mun ella í ávísan mun hevur týdning fyri tey.

**Mynd 15: Týdningurin av arbeiðinum**




Sp.: *Hevur arbeiðið stóran týdning fyri teg?*

**Mynd 16: Stoltir av starvinum**




Sp.: *Ert tú stolt av starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur?*

Somu fatan fáa vit, um vit spyrja, hvørt teir eru stoltir av at vera sjúkrarøktarfrøðingar. Sum sæst á myndini, so siga 89%, at teir antin í stóran mun ella í ávísan mun eru stoltir av sínum arbeiði.

Áhugavert er eisini, at 61% av sjúkrarøktar-frøðingum halda, at samsvar er millum *tað góða arbeiðið* og teirra núverandi starv í stóran ella ávísan mun. Kortini eru tað 38%, sum halda, at tað antin í minni mun ella als ikki er samsvar millum tað góða arbeiðið og teirra núverandi starv.

**Mynd 17: Tað góða arbeiðið og starv í løtuni**




Sp.: *Heldur tú, at tað er samsvar millum arbeiðið, sum tú hevur nú og "tað góða arbeiðið", sum tú hugsaði um í svarinum omanfyri?*

## Samandráttur

Samanumtikið kunna vit staðfesta, at hóast nøgdsemið við arbeiðið sum heild millum sjúkrarøktarfrøðingar er høgt, so vísir kanningin, at trivnaðurin er minkaður seinnu árini. Kanningin vísir eisini, at ein greiður meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingum umhugsa at søkja annað starv.

Arbeiðið hevur stóran týdning fyri sjúkrarøktarfrøðingar, og teir eru stoltir av teirra starvi. Somuleiðis hevur góð leiðsla nógv at týða fyri teir. Tølini vísa eisini, at hjá tveimum triðingum av sjúkrarøktarfrøðingunum uppfyllir teirra núverandi starv tað, ið hesin samfelgasbólkurin metir sum eitt gott arbeiði. Tað er áhugavert, at sjúkrarøktarfrøðingar ikki hava so stóran áhuga í at koma í hægri starv. Hugsast kann, at sjúkrarøktarfrøðingar eru meira áhugaðir í at veita sjúkrarøkt enn karrieru í vanligum týdningi.

# 4. Partur: Krøv í arbeiðinum

## Krøv, greidleiki og mátin evnini verða nýtt í arbeiðinum.

Tá vit skulu viðgera krøv í arbeiðinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum, er umráðandi at hava í huga, at tað er torgreitt og trupult at máta “krøv í arbeiðinum”. At krøvini eru høg í einum starvi, nýtist ikki neyðturviliga at merkja tað sama sum, at starvsfólkini eru strongd og ikki megna uppgávurnar. Høg krøv kunnu eins væl merkja, at stórar avbjóðingar eru í starvinum. Tað, sum er avgerandi, sambært kanningum av arbeiðsumhvørvi aðra staðir, er, at ávirkan á egnu arbeiðsumstøður og sosialur stuðul eru linnandi faktorar, eins og manglandi ávirkan og stuðul kunnu viðføra strongd (ávirkan og stuðul í arbeiðinum verða viðgjørd nærri niðanfyri).

Umframt at lýsa kvantitativ og kvalitativ krøv, eiga vit tí eisini at hygga eftir, um sjúkrarøktarfrøðingarnir kenna, at teirra arbeiðsuppgávur eru greiðar (rolleklarhed). Kenna teir greitt, hvat arbeiðsplássið væntar av teimum, ella eru krøvini mótstríðandi. Talva 3 vísir, hvussu sjúkrarøktarfrøðingarnir meta hesi viðurskifti.

**Talva 3: Mótstríðandi krøv í arbeiðinum**

| | Í sera stóran mun | Í stóran mun | Lutvíst | Í lítlan mun | Í sera lítlan mun | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mást tú viðhvørt gera okkurt í arbeiðinum, sum tú heldur vera óneyðugt? | 9% | 15% | 43% | 25% | 8% | 409 |
| Mást tú viðhvørt gera okkurt, sum eftir røttum átti at verið gjørt øðrvísi? | 6% | 13% | 42% | 25% | 13% | 410 |
| Verða mótstríðandi krøv sett í tínum arbeiði? | 6% | 10% | 42% | 24% | 17% | 409 |
| Gert tú okkurt í arbeiðinum, sum nøkur góðtaka og onnur ikki? | 6% | 12% | 39% | 23% | 20% | 409 |

Vert er at leggja til merkis, at 42% kenna, at lutvíst mótstríðandi krøv verða sett teimum í arbeiðinum og 39%, at teir lutvíst gera okkurt í arbeiðinum, sum nøkur góðtaka og onnur ikki. Hesi tøl mugu metast at vera lutfalsliga høg.

Vert er eisini at leggja til merkis, at ein stórur meiriluti, 87%, sigur, at hann greitt veit, hvørja ábyrgd hann hevur í arbeiðinum, sí mynd 18.

Lutfalsliga nógvir halda, at mótstríðandi krøv verða sett teimum í arbeiðinum, men kortini hevur ein stórur partur av teimum eina greiða fatan av, hvørja ábyrgd teir hava í arbeiðinum.

**Mynd 18: Krøv í arbeiðinum og ábyrgd**




Sp.: *Veist tú greitt, hvørja ábyrgd tú hevur í arbeiðinum?*

Í innleiðandi samrøðunum, í smb. við fyrireiking av verkætlanini kom m. a. fram, at sjúkrarøktarfrøðingar kunnu uppliva mótstríðandi krøv frá t.d. læknum, sjúklingum og avvarðandi. Hugsast kann eisini, at tær nógvu broytingarnar, ið eru farnar og framvegis fara fram í heilsuverkinum hava ávirkan á hesi viðurskifti.

Vert er eisini at leggja til merkis, at ein lutfalsliga stórur meiriluti, 80%, er antin sera væl nøgdur ella nøgdur við mátan, hansara evni verða nýtt á arbeiðsplássinum.

**Mynd 19: Krøv í arbeiðinum og mátin evnini verða nýtt**




Sp.: *Spurningar um arbeiðið sum heild. Hvussu væl nøgd ert tú við mátan tíni evni verða nýtt?*

Millum tey nøktandi viðurskiftini eru sostatt, at ein lutfalsliga stórur meiriluti kennir greitt, hvørja ábyrgd hann hevur í arbeiðinum. Eisini er ein stórur meiriluti antin sera væl nøgdur ella nøgdur við mátan, hansara evni verða nýtt.

## Kvantitativ krøv

Kvantitativ krøv snúgva seg um, hvussu samsvarið er ímillum arbeiðsnøgd og tíðina, ið er tøk at útinna uppgávurnar í. Fyri at greina hetta, hava vit spurt um sjúkrarøktarfrøðingarnir eru nøgdir við ta tíðina, sum er tøk til at røkja teirra starv. Úrslitið av hesum spurningum, síggja vit á talvuni niðanfyri.

**Talva 4: Kvantitativ krøv í arbeiðinum**

| | Altíð | Ofta | Onkuntíð | Sjáldan | Ongantíð /Næstan ongantíð | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Er neyðugt at arbeiða sera skjótt | 15% | 51% | 28% | 5% | 1% | 409 |
| Er arbeiðið ójavnt býtt, so at tað hópar seg upp? | 2% | 23% | 44% | 25% | 5% | 408 |
| Hvussu ofta hendir, at tú ikki nær Allar arbeiðsuppgávurnar? | 2% | 25% | 42% | 25% | 6% | 410 |
| Er neyðugt at arbeiða yvirtíð? | 1% | 24% | 44% | 23% | 7% | 409 |
| Mást tú leypa steðgir um, tí tað er ov nógv at gera? | 6% | 37% | 36% | 16% | 4% | 408 |

Sum sæst í talvuni, so kemur tað fyri, at sjúkrarøktarfrøðingarnir ikki náa allar arbeiðsuppgávurnar - 42% siga, at tað kemur *onkuntíð* fyri, at allar arbeiðsuppgávurnar verða náddar. Tað kemur eisini fyri, at arbeiði hópar seg upp – hetta vísa 44% á - og at teir onkuntíð eisini mugu arbeiða yvir – hetta vísa 44% á. Vert er at leggja til merkis, at 37% siga seg noyðast at leypa steðgir um ofta og 36% onkuntíð.

Ein sjúkrarøktarfrøðingur, ið starvast í heimarøktini tekur soleiðis til:

*"Í heimarøktini er tað ein óskriva lóg, at tú skal vera í "sving" alla tíðina. Og gera so nógv sum tilber, helst yvirganga hvønnannan! Leiðslan hevur eisini tann holdningin at vit sjúkrarøktarfrøðingar altíð kunnu gera meira og meira – hóast man "roynir" at melda út at man hevur bara 2 armar og 2 bein... Eg haldi nógvar eru útbrendar av hesum, og eg eri eisini deyða troytt av hesum... Í hesum arbeiði er meira dentur lagdur á kvantitetin enn á kvalitetin"* (SRF, aldur ikki upplýstur).

Ein sjúkrarøktarfrøðingur á einum ellis-/røktarheimi tekur soleiðis til:

*Arbeiðsumstøður, bæði fysiskar og psykiskar, eru ikki í samsvar við tað ein lærir undir útbúgving. Sparingar og arbeiðsbyrðan ger, at ómøguligt er at liva upp til*

*krøvini fyri sjúkrarøkt í einum modernaðum samfelagi. Hetta elvir til konstantar frustratiónir og strongd hjá tí einstaka sjúkrarøktarfrøðinginum, tí ein megnar ikki at geva ta røkt, ein hevur lært um undir útbúgving. Praktiski veruleikin er als ikki í samsvar við forvæntningarnar samfelagið hevur til sjúkrarøkt. Orsøkin er sparingar/ov lágar normeringar. Fyribyrgingararbeiði hevur eingin tíð ella ráð til. Ofta kennir ein tað, sum talan er um discountsjúkrarøkt"* (SRF, 34 ár).

Í búskaparkreppuni í Føroyum fyrst í 1990unum vóru normeringarnar innan starvsøki hjá sjúkrarøktarfrøðingum tiknar av. Í teimum innleiðandi samrøðunum við sjúkrarøktarfrøðingar, vísti tað seg at vera ein sera stór ónøgd við hetta. Vit hava eisini í spurnablaðskanningini spurt um, hvussu samsvarið er millum tal av sjúkrarøktar-frøðingum í mun til tal av sjúklingum/brúkarum. Hvussu sjúkrarøktar-frøðingarnir meta hesa viðurskifti, síggja vit á mynd 20.

**Mynd 20: Tal av brúkarum/sjúklingum í mun til sjúkrarøktarfrøðingar**




Sp.:*Í hvønn mun er talið av brúkarum/sjúklingum fyri sjúkrarøktarfrøðing á arbeiðsplássinum*

Sum sæst á myndini, so meta meiri enn helvtin av sjúkrarøktarfrøðingunum, at samsvarið millum tal av brúkarum/sjúklingum og sjúkrarøktarfrøðingum er antin í stóran mun ella ávísan mun nøktandi. Kortini eru tað ein triðingur, sum ikki meta hetta talið at vera nøktandi. Hugsast kann, at henda ónøgd starvar frá økjum – t.d. ellis- og røktarheimum, seingjardeildum á sjúkrahúsunum og heimarøktini – har sjúkrarøktarfrøðingurin hevur ábyrgd av fleiri brúkarum/sjúklingum í senn.

## Kvalitativ krøv

Eitt eyðkenni við teimum krøvum, ið eru tengd at klientarbeiði er, at tú skalt arbeiða professionelt við fólki, sum kunnu vera í sera truplum støðum, umframt at tey kanska eisini kunnu vera sera krevjandi, og tú sum starvsfólk kanst vera noyddur at goyma tínar kenslur. Tín lutur í arbeiðinum verður mettur í mun til nakrar fakligar og professionellar normar. Starvið sum sjúkrarøktarfrøðingur kann tískil vera sera krevjandi kensluliga og kognitivt. Hinvegin kennist tað eisini oftani sera innihaldsríkt. Hetta síggja vit, tá sjúkrarøktarfrøðingarnir lýsa "tað góða arbeiðið". Heili 95% av sjúkrarøktarfrøðingunum siga, at arbeiðið hjá teimum antin í stóran mun ella í ein ávísan mun er týdningarmikið.

Talvan niðanfyri lýsir nøkur av teimum kognitivu krøvunum, sum verða sett sjúkrarøktarfrøðingum í teirra arbeiði.

**Talva 5: Krøv í arbeiðinum: kognitiv krøv**

| | Altíð | Ofta | Onkuntíð | Sjáldan | Ongantíð /Næstan ongantíð | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Er neyðugt at hava yvirlit yvir nógv ymiskt samstundis í arbeiðinum? | 35% | 48% | 12% | 4% | 1% | 410 |
| Krevur arbeiðið, at tú dugir væl at koma við hugskotum? | 17% | 45% | 31% | 4% | 1% | 409 |
| Krevur arbeiðið, at tú minnist nógv*? | 44% | 39% | 12% | 4% | 0% | 409 |
| Krevur arbeiðið, at tú tekur torførar avgerðir? | 9% | 34% | 44% | 11% | 1% | 409 |

Ávikavist 35% og 48% av teimum kenna, at teir altíð ella ofta skulu hava yvirlit yvir nógv ymisk viðurskifti samstundis, og harumframt at teir skulu minnast nógv í arbeiðinum. Ávikavist 44% og 39% siga, at arbeiðið altíð ella ofta krevur, at teir minnast nógv. Hetta samsvarar eisini væl við, hvussu sjúkrarøktarfrøðingarnir lýstu teirra starv í teimum innleiðandi samrøðunum og í teimum persónligu viðmerkingunum í spurnablaðnum: *at teirra uppgáva í stóran mun er at samskipa og vera millumlið í viðgerðini av brúkaranum/sjúklinginum.*

Vit eiga eisini at leggja til merkis, at ávikavist 34% og 44% halda, at starv teirra krevur, at teir ofta og onkuntíð skulu taka torførar avgerðir. Hetta samsvarar

eisini væl við viðurskifti, sum teir løgdu dent á í teimum innleiðandi samrøðunum og í teimum persónligu viðmerkingunum í spurnablaðnum um tey eyðkenni, ið starvið hevur.

Hyggja vit eftir teimum kensluligu krøvunum, sum arbeiðið hjá teimum setur, síggja vit á talvu 6, at umleið helmingurin kennir, at teir onkuntíð koma í torførar støður, kenna starvið kensluliga tyngjandi og verða kensluliga rørdir av arbeiðinum.

**Talva 6: Krøv í arbeiðinum: kenslulig krøv**

| | Altíð | Ofta | Onkuntíð | Sjáldan | Ongantíð /Næstan ongantíð | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu ofta kemur tú í kensluliga torførar støður? | 1% | 32% | 52% | 13% | 1% | 410 |
| Er arbeiðið kensluliga tyngjandi | 2% | 27% | 50% | 18% | 3% | 410 |
| Verður tú kensluliga rørd/-ur av arbeiðinum? | 1% | 19% | 59% | 16% | 4% | 410 |
| Krevur arbeiðið, at tú letur vera við at siga tína hugsan? | 1% | 12% | 44% | 30% | 12% | 410 |
| Krevur arbeiðið, at tú goymir tínar kenslur? | 3% | 17% | 44% | 24% | 10% | 409 |

Á talvu 6 síggja vit, at 44% siga, at starvið onkuntíð krevur, at teir goyma kenslurnar og lata vera við at siga sína hugsan. Hetta sigur kanska ikki so nógv í sjálvum sær, men eigur at verða mett saman við tí stuðli, sum starvsfólkini hava "atgongd" til á teimum einstøku arbeiðsplássunum. Tað eru júst tey kensluligu krøvini til starvsfólk í heilsuverkinum, sum kunnu vera serliga tyngjandi. Starvsfólkini eru til tíðir noydd at goyma sínar kenslur – kanska serliga tær negativu kenslurnar. Útbúgving, supervisjón og faklig sparring eru avgerandi faktorar, ið kunnu linna um og hjálpa starvsfólkunum at handfara hesi viðurskifti. Atgongd til útbúgving er heilt grundleggjandi, supervisjón gevur starvsfólkunum høvi at skifta orð um arbeiðið við fólk uttanífrá, og faklig sparring við nærmasta leiðara og starvsfelagar gevur teimum høvi at tosa um arbeiðsviðurskifti í gerandisdegnum. Hvussu sjúkrarøktarfrøðingar meta hesa viðurskifti, fara vit at lýsa gjøllari í næsta parti.

## Samandráttur

Tá umræður arbeiðsviðurskiftini hjá sjúkrarøktarfrøðingum, so er tað ein lutfalsliga stórur meiriluti, ið greitt kennir, hvørja ábyrgd teir hava í arbeiðinum og eru antin sera væl nøgdir ella nøgdir við mátan, teirra evni verða nýtt.

Somuleiðis meta meira enn helvtin av sjúkrarøktarfrøðingunum, at samsvarið millum tal av brúkarum/sjúklingum í mun til tal av sjúkrarøktarfrøðingum antin í stóran mun ella ávísan mun er nøktandi. Kortini eru tað ein triðingur, ið ikki metir at samsvar er millum tal av brúkarum/sjúklingum og tal av sjúkrarøktarfrøðingum.

Harumframt sigur nærum helmingurin av teimum, at starvið hjá teimum onkuntíð krevur, at teir goyma kenslurnar og lata vera við at siga sína hugsan. Hetta sigur kanska ikki so nógv í sjálvum sær, men skal metast í mun til tann stuðul, sum sjúkrarøktarfrøðingarnir hava "atgongd" til á teirra arbeiðsplássi.

# 5. Partur: Ávirkan í arbeiðinum

## Sjálvræði

Sum víst á í innganginum, so eru ávirkan á egnu arbeiðsumstøður og førleikamenning tveir sera týðandi tættir í mun til trivnað á einum arbeiðsplássi. Kanningar aðrastaðir hava víst, at lítil ávirkan á egnu arbeiðsumstøður og manglandi førleikamenning økja um mistrivnað, strongd og sjúkrafráveru. Hinvegin so gevur ávirkan á egnar arbeiðsumstøður hægri motivasjón, betri góðsku og størri produktivitet í arbeiðinum.[19]

Fyri at lýsa, hvussu sjúkrarøktarfrøðingarnir í hesari kanning meta sjálvræði og førleikamenning á sínum arbeiðsplássi, hava vit spurt um nógv ymisk viðurskifti og draga nøkur sentral sjónarmið fram her.

Alment kunnu vit (sambært talvuni niðanfyri) siga, at sjúkrarøktarfrøðingar ikki meta seg hava stórvegis ávirkan á egnar arbeiðsumstøður. 62% siga, at teir onkuntíð, sjáldan og ongantíð/næstan ongantíð hava ávirkan á stórar avgerðir á teirra arbeiðsplássi.

**Talva 7: Ávirkan á arbeiðsumstøðurnar**

| | Altíð | Ofta | Onkuntíð | Sjáldan | Ongantíð/ Næstan ongantíð | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Hevur tú stóra ávirkan á, hvørjar avgerðir verða tiknar um títt arbeiði? | 7% | 31% | 33% | 20% | 9% | 407 |
| Hevur tú ávirkan á, hvat tú gert í tínum arbeiði? | 24% | 48% | 19% | 6% | 3% | 410 |
| Hevur tú ávirkan á, hvønn tú arbeiðir saman við/ert á vakt saman við? | 9% | 12% | 15% | 16% | 49% | 395 |
| Hevur tú ávirkan á nøgdina av arbeiði? | 9% | 19% | 25% | 22% | 25% | 405 |

Tó eiga vit at leggja til merkis, at 72% siga seg altíð ella ofta hava ávirkan á, hvat teir gera í sínum arbeiði. Hesi tøl kunnu lesast sum, at teir hava ávirkan í gerandisdegnum, men kanska ikki í so stóran mun, tá "størri" avgerðir skulu takast.

[19] Sí til dømis kanning, sum AMI hevur gjørt av eini royndarverkætlan á einum psykiatriskum sjúkrahúsi í Danmark, har starvsfólkini sjálvi vóru við til at leggja vaktarskema. Kanningin vísti – millum annað – at nøgdsemið millum starvsfólkini vaks, færri býttu vaktir um og sosiali stuðulin frá starvsfeløgum og samanhaldið á arbeiðsplássinum vaks (Albertsen 2006).

Um vit hinvegin hyggja eftir, hvussu teir meta ávirkan, tá talan er um, a) hvønn teir arbeiða saman við og b) nøgd av arbeiði, so siga ávikavist 80% og 72% seg onkuntíð, sjáldan og ongantíð/næstan ongantíð hava ávirkan á hesi viðurskifti. Í mun til nøgd av arbeiði eiga vit at hava í huga, at eitt eyðkenni við starvinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum er óvæntaðar hendingar, sum kunnu gera, at teir ikki altíð hava ávirkan á, hvussu arbeiðsgongdin er, og hvussu stórur ágangurin er í gerandisdegnum.

## Førleikamenning

Tær kreftir, ið eru galdandi fyri samfelagið í dag, fara við vissu at seta áhaldandi nýggj og onnur krøv til yrkisføri og arbeiðsumstøður hjá tí einstaka sjúkrarøktarfrøðingum. Brúkararnir/sjúklingarnir eru betri útbúnir og meiri tilvitaðir um egin ynskir, egnan tørv og egnir viðgerðarhættir/møguleikar, umframt at almanna- og heilsuverk sum heild eru í støðugari menning.

Vit spurdu sjúkrarøktar-frøðingarnar, um teir mettu, at fakligu krøvini vóru økt tey seinnu árini. 82% av teimum halda, at krøvini í stóran mun og í ávísan mun eru økt.

**Mynd 21: Fakligu krøvini eru økt**




Sp: *Heldur tú, at fakligu krøvini sum heild eru broytt árini?*

Nógvir sjúkrarøktarfrøðingar hava nýtt høvi at siga sína hugsan um møguleikarnar fyri førleikamenning og eftirútbúgving á aftasta síðu í spurnablaðnum. Ein tekur soleiðis til:

*"Tíbetur er sjúkrarøktin nógv ment. Krøvini eru økt tilsvarandi sum viðgerðir og kunnleiki innan læknavísind eru økt. Vit hava stóran tørv á eftirútbúgving og førleikamenning. Og her haltar alvorliga, eftir mínari meining"* (SRF, 55-66 ár).

**Mynd 22: Meting av fakligum førleika**




Sp.: *Hvussu metir tú tín fakliga førleika at vera í mun til krøvini í tínum arbeiði?*

Vit spurdu teir eisini, hvussu teir mettu sín fakliga førleika at vera í mun til krøvini starvinum. Úrslitið av hesum spurningi sæst á mynd 22.

Sum heild meta teir, at sín fakliga førleika samsvara við krøvini í arbeiðinum. 53% siga fakliga førleikan at vera antin sera góðan ella góðan. Vert er tó at leggja til merkis, at 31% halda hann einans at vera nøktandi.

Ein stórur meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingunum siga, at eftirútbúgving og førleikamenning eru neyðug í teirra starvi. Hetta samsvarar væl við teir dynamikkir og tey krøv, ið samfelagið í dag setur til yrkisføri.

Hóast teir flestu halda teirra fakliga førleika at vera antin sera góðan ella góðan, so vísa nógvir ónøgd við møguleikarnar fyri førleika-menning og eftirútbúgving í teimum skrivligu við-merkingunum.

Nøkur dømi eru her:

*"Møguleiki fyri at "uppfríska" og ajour føra seg skuldi veri størri. Til dømis hevði veri gott um til bar at fara í skúlan at fylgja við í ávísum lærugreinum har ein følir seg vera komna ov lagt frá og manglar tað nýggjast"* (SRF, 45-54 ár).

**Mynd 23: Eftirútbúgving og førleikamenning eru neyðug**




Sp.: *Eru eftirútbúgving og førleikamennig neyðug í tínum starvi?*

*"Stórur trupulleiki at sleppa, at víðari menna seg, t.d. taka skeiðir á víðari útbúgving. Hóast fleiri royndir at fáa økonomiskan stuðul til slíkt, fær ein mest noktandi svar. Nærmasta leiðsla eggjar, men ovast leiðsla ... niðurprioriterar hetta. Ovast leiðsla átti at prioriterað nógv hægri, at haft vælútbúgvi fólk (sj.frøðingar)..."* (SRF, 25-34 ár).

*"Tað er ótruliga áhugavert, spennandi, gevandi og til tíðir strævið at vera sjúkrarøktarfrøðingur. Broytingar sum heild í samfelagnum og á sjúkrahúsum í dag gera, at alt verður meiri spesialiserað. Tað er neyðugt í menningin av røktini og viðgerðini, men her er tað tann stóri trupulleikin, at starvsfólkið bert minkar runt um, so tær, sum eru eftir ikki hava tíð til at seta seg inn í nýggj ting. Hetta hongur eisini saman við vantandi fígging til undirvísing, sum er ein stór mangulvøra. Tað avhongur alt ov nógv av initiativinum hjá tí einstøku, hvussu dagførd hon er. Heldur skuldu hetta verið ein afturvendandi møguleiki og helst krav, sum t.d. í Englandi, at verðið tjekkað innímillum við royndum"* (SRF, 45-54 ár).

Hesa ónøgd síggja vit eisini aftur í tølum. Vit spurdu um teir vóru nøgdir við møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving. Sum sæst á myndini, so sigur ein stórur meiriluti (72%), at møguleikarnir eru als ikki ella í minni mun nøktandi.

**Mynd 24: Nøgdsemi við møguleikar fyri førleikamenning og eftirútbúgving**




Sp.: *Heldur tú, at møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving eru nøktandi?*

## Samandráttur

Kanningin vísir, at ein meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingunum halda, at teir onkuntíð, sjáldan og ongantíð/næstan ongantíð hava ávirkan á stórar avgerðir á arbeiðsplássinum. Tó heldur ein meiriluti seg eisini hava ávirkan á, hvat teir gera í sínum dagliga arbeiði. Hetta kann týðast sum, at teir kenna seg at hava

ávirkan í gerandisdegnum, men kanska ikki í so stóran mun, tá “størri” avgerðir skulu takast.

Tað vísir seg at vera ein stór ónøgd við møguleikarnar fyri førleikamenning og eftirútbúgving. Kortini halda meira enn helmingurin, at teirra fakligi førleiki antin er sera góður ella góður.

# 6. Partur: Stuðul

## Arbeiðsumhvørvið sum heild

Í hesum partinum fara vit at greina og lýsa, hvussu sjúkrarøktarfrøðingar síggja viðurskifti viðvíkjandi starvsfeløgum og leiðsluni á sínum arbeiðsplássi. Harumframt verður spurningurin um nøgdsemi við samsýning eisini viðgjørdur.

Tá talan er um sosiala umhvørvið, so sýnast sjúkrarøktarfrøðingar sum heild at vera nøgdir. Mynd 25 vísir, so eru 80% antin sera væl nøgdir ella nøgdir við sosiala umhvørvið á sínum arbeiðsplássi.

**Mynd 25: Sosiala umhvørvið og nøgdsemi**




Sp.: *Spurningar um arbeiðið sum heild. Hvussu væl nøgd er tú við sosiala umhvørvið?*

Sosiala umhvørvið á einum arbeiðsplássi kann sum heild vera gott, hóast nógvir trupulleikar eru í dagliga arbeiðinum. Fyri at fáa eina nágreiniligari lýsing av viðurskiftunum millum starvsfelagar, leiðslu og fakliga umhvørvið, spurdu vit um eina røð av ymiskum viðurskiftum, sum hava týdning fyri menning og trivnaðin á einum arbeiðsplássi.

Sum sæst á talvuni niðanfyri, so fáa vit eina sera fjølbroytta mynd av, hvussu sjúkrarøktarfrøðingar hava tað í sínum nærumhvørvi.

**Talva 8: Lýsing av arbeiðsumhvørvi**

| | Í stóran mun | Í ávísan mun | Í minni mun | Als ikki | Veit ikki | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólk eru opin fyri uppskotum og nýggjum tiltøkum | 15% | 54% | 23% | 6% | 1% | 407 |
| Fólk stuðla hvørjum øðrum og loysa trupulleikarnir í felag | 13% | 46% | 28% | 10% | 1% | 407 |
| Hvør passar sítt | 16% | 41% | 25% | 14% | 2% | 406 |
| Tað eru nógvar óloystar ósemjur | 23% | 28% | 29% | 10% | 6% | 400 |
| Umhvørvið er fakliga kveikjandi og spennandi | 20% | 38% | 27% | 13% | 1% | 407 |
| Gott kollegialt umhvørvi | 36% | 45% | 12% | 5% | 1% | 408 |
| Góð viðurskifti millum leiðslu og sjúkrarøktarfrøðingar | 15% | 31% | 25% | 26% | 2% | 408 |
| Eitt gott og vinarligt umhvørvi | 30% | 50% | 15% | 3% | 0% | 406 |
| Eitt strongjandi umhvørvi | 17% | 46% | 24% | 10% | 1% | 406 |
| Ein køvandi stemningur | 9% | 23% | 26% | 38% | 2% | 405 |
| Umhvørvið er eyðkent av stagnasjón | 14% | 33% | 22% | 26% | 3% | 405 |

Heili 81% lýsa arbeiðsplássið at hava eitt gott kollegialt umhvørvi og heili 80% siga, at arbeiðsplássið er eyðkent av einum vinarligum umhvørvi. Harumframt halda 59%, at fólk stuðla hvørjum øðrum og loysa trupulleikar í felag. Kortini eru tað 57%, ið meina, at hvør passar sítt. Tað er ilt at siga, hví hendan andsøgn er, men hugsast kann, at tað er tí at teir arbeiða nógv sjálvstøðugt og hava nógv at síggja til.

Í mun til fakliga umhvørvið, so meta 69%, at fólk eru opin fyri nýggjum hugskotum og 58% at umhvørvið er fakliga kveikjandi. Kortini eru tað 47% sum halda, at umhvørvið er eyðkent av stagnasjón.

At 57% halda, at fólk sum heild passa sítt og 47%, at arbeiðsumhvørvið hjá teimum er eyðkent av stagnasjón, kann skyldast viðurskifti á einstøkum arbeiðsplássum, men hava vit ikki møguleika at eftirkanna hetta.

Hóast ein meiriluti lýsir viðurskiftini millum starvsfelagarnar sum góð og umhvørvið sum opið og fakliga kveikjandi, eru tað kortini 51% (annar hvør), sum halda, at tað eru nógvar óloystar ósemjur. Hetta er eitt rættiliga høgt tal og má metast at vera nakað, sum ávirkar trivnaðin negativa vegin.

Vit hava eisini spurt sjúkrarøktarfrøðingarnar, hvørt teir mettu, at tað vóru fleiri ella færri ósemjur á arbeiðsplássinum. Úrslitið frá hesum spurningi, sæst í mynd 26.

43% halda, at fleiri ósemjur hava verið tey seinnu árini, meðan 47% siga, at støðan er óbroytt, ella at tað ikki hava verið ósemjur av týdningi.

**Mynd 26: Ósemjur á arbeiðsplássinum**




Sp.: *Heldur tú, at tað tey seinnu árini hava verið fleiri ósemjur á tínum arbeiðsplássi?*

Vit spurdu eisini sjúkrarøktarfrøðingarnar, hvørjar orsøkirnar teir hildu vera til, at tað vóru fleiri ósemjur.[20] Sum vit síggja, so halda meiri enn helmingurin (58%), at leiðslustílurin er ein orsøk til ósemjurnar. Harumframt meina nógvir, at ov stór arbeiðsnøgd og umsitingarligar broytingar eisini eru tvær meginorsøkir til ósemjurnar.[21]

[20] Legg til merkis, at fleiri ymisk viðurskifti kundu veljast, og tí verður samlaða talið ikki 100%.
[21] Áður nevnda limakanning av trivnaðinum hjá lærarum í fólkaskúlanum vísti eisini, at nógvir lærarar mettu leiðslustílin at vera eina orsøk til ósemjur umframt arbeiðsnøgd og strongd ( Mortensen 2002).

**Mynd 27: Orsøk til ósemjur**




Sp.: *Um ósemjur hava verið, hvørjar heldur tú orsøkirnar vera?*

Ónøgdina við leiðsluháttin síggja vit aftur í teimum skrivligu viðmerkingunum. Fleiri av hjá teimum spurdu viðgera leiðsluviðurskifti. Nøkur dømi:

*" Fleiri av sp. har eg svari "ónøgd" ella "ikki nóg gott" stava í fleiri førum frá "vánaligari" leiðslu. Kundi verið munandi betri um leiðslan var kompetentari. Hon ávirkar negativan rætning"* (SRF, 35-44 ár).

*"...Leiðslan vil spara og leggja deildir saman, og fyri ikki at skula siga fólk upp, so verður man koyrdur í stuttvarandi avloysarastørv, og gangur eisini leysur (tímaløntur) innímillum"* (SRF, 25-34 ár).

*"Leiðsla dugir ikki at hugsa hvussu fáa vit eina kvalitetssjúkrarøkt – hvussu fáa vit tað besta produktið – hvat vilja vit standa inni fyri. Leiðsla hugsar mest økonomi – at tilfredsstilla uppeftir og ikki fyrst og fremst sjúklingin"* (SRF, 35-44 ár).

*"Elski mítt arbeiði sum sjúkrarøktarfrøðingur. Samstarvið við kollegarnar er super gott. Leiðslan ger tó onki gott fyri trivnaðin hjá okkum... Fakliga leiðslan ger heldur onki fyri at vit kunnu menna okkum"* (SRF, 25-34 ár).

Ein deildarleiðari skrivar soleiðis:

*"Illa fráboðaðar broytingar, skapa ótryggleika ónøgd og strongd... Ovasta leiðsla ikki góð til at tosa við "gólvfólkið" um broytingar. Avgerð verður alt ov ofta tikin yvir høvdið á starvsfólkunum"* (SRF, 55-66 ár).

Fyri at fáa eina nágreiniligari lýsing av viðurskiftunum millum leiðslu og starvsfólk, hava vit eisini spurt um ymisk viðurskifti millum leiðslu og starvsfólk, ið hava týdning fyri trivnaðin og menningina á einum arbeiðsplássi. Hesum greiða vit nærri frá niðanfyri.

## Leiðsluviðurskifti

Annarhvør (52%) sjúkrarøktarfrøðingur sigur, at viðurskiftini millum leiðslu og starvsfólk eru antin minni góð ella als ikki góð. Hetta kann skyldast viðurskifti á einstøkum arbeiðsplássum, men má kortini metast at vera eitt rímiliga høgt tal. Meginparturin av teimum spurdu halda, at teirra nærmasti leiðari ikki í nóg góðan mun syrgir fyri menningarmøguleikum hjá tí einstaka sjúkrarøktarfrøðinginum. Hyggja vit á talvu niðanfyri, síggja vit, at heili 78% halda, at teirra nærmasti leiðari einans lutvíst, í lítlan mun og í sera lítlan mun syrgir fyri, at tann einstaki sjúkrarøktarfrøðingurin hevur góðar menningarmøguleikar.

**Mynd 28: Viðurskifti millum leiðslu og sjúkrarøktarfrøðingar**




Sp.:*Hvussu vilt tú lýsa arbeiðsumhvørvið? Góð viðurskifti millum leiðslu og sjúkrarøktarfrøðingar*

**Talva 9: Í hvønn mun kanst tú siga, at tín nærmasti leiðari...**

| | Í sera stóran mun | Í stóran mun | Lutvíst | Í lítlan mun | í sera lítlan mun | Vantar/ Ikki svara | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ...syrgir fyri, at tann einstaki sjúkrarøktarfrøðingurin hevur góðar menningarmøguleikar? | 4% | 15% | 37% | 26% | 15% | 4% | 407 |
| ...raðfestir trivnað á arbeiðsplássinum? | 9% | 24% | 31% | 21% | 13% | 3% | 402 |
| ...dugir væl at leggja arbeiðið til rættis? | 6% | 22% | 34% | 21% | 13% | 4% | 399 |
| ...dugir væl at loysa konfliktir? | 5% | 16% | 31% | 22% | 23% | 4% | 399 |

Somu mynd fáa vit, tá talan er um at raðfesta trivnað, at leggja arbeiðið til rættis og at loysa konfliktir. 65% av teimum spurdu halda, at nærmasti leiðari einans lutvíst, í lítlan mun ella í sera lítlan mun raðfestir trivnað á arbeiðsplássinum. Tá talan er um at leggja arbeiðið til rættis og at loysa konfliktir siga ávikavist 68% og 76% av teimum spurdu, at teirra nærmasti leiðari dugir lutvíst, í lítlan mun ella sera lítlan mun at leggja arbeiðið til rættis og loysa konfliktir.

Talvan niðanfyri er eitt mát fyri leiðsludygd. Leiðsludygd verður mett eftir, hvussu ídnar leiðslur eru at veita starvsfólkunum stuðul og feedback (bæði positivt og negativt).

**Talva 10: Feedback og stuðul frá nærmastu leiðslu**

| | Altíð | Ofta | Onkuntíð | Sjáldan | Ongantíð/ Næstan ongantíð | Vantar/Ikki svarað | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu ofta fært tú hjálp og stuðul frá tínum nærmasta leiðara? | 10% | 22% | 39% | 20% | 9% | 1% | 408 |
| Hvussu ofta eru tín nærmast leiðari til reiðar at lurta eftir tínum trupulleikum í arbeiðinum? | 13% | 27% | 29% | 23% | 6% | 2% | 406 |
| Hvussu ofta tosar tú við tín nærmasta leiðara um, hvussu gott tú gert títt arbeiði? | 1% | 7% | 23% | 33% | 35% | 2% | 407 |
| Hvussu ofta hevur tú fakliga sparring við tín nærmasta leiðara? | 1% | 6% | 21% | 27% | 44% | 1% | 410 |

Talvan vísir, at 39% onkuntíð fáa hjálp frá sínum nærmasta leiðara og 29% sjáldan og ongantíð/næstan ongantíð. Harafturat siga 29%, at teirra nærmasti leiðari onkuntíð er til reiðar at lurta eftir teirra trupulleikum í arbeiðinum og 29% sjáldan og ongantíð/næstan ongantíð. Harumframt siga ávikavist 35% og 44%, at teir ongantíð/næstan ongantíð tosa við sín nærmasta leiðara um, hvussu væl teir gera arbeiðið og hava fakliga sparring við viðkomandi. At ávikavist 35% og 44% halda seg ongantíð/næstan ongantíð tosa við sín nærmasta leiðara um, hvussu væl teir gera sítt arbeiði og hava fakliga sparring við viðkomandi, má metast at vera rímiliga høg tøl.

Í mun til supervisjón - professjónellan stuðul - eru 56% (meiri enn helvtin) illa ella sera illar nøgdir

Hyggja vit eftir kunning frá leiðslu um týdningarmiklar avgerðir, síggja vit á mynd 30, at triðingurin í stóran ella í ein ávísan mun meta seg fáa upplýsingar um týdningarmiklar avgerðir í góðari tíð.

**Mynd 29: Supervisjón og nøgdsemi**




Sp.: *Hvussu nøgd ert tú við møguleikarnar fyri supervisjón á tínum arbeiðsplássi?*

Hinvegin halda tveir triðingar (64%), at teir einans í minni mun ella als ikki verða kunnaðir um týdningarmiklar avgerðir í góðari tíð.

Leggjast kann afturat, at nýggjastu kanningar í arbeiðsumhvørvi vísa, at *álit á leiðsluni* á einum arbeiðsplássi hevur størri týdning fyri trivnaðin enn ávirkan á arbeiðs-umstøðurnar, sum áður hildið.

Trivnaður/mistrivnaður á arbeiðsplássum er neyvt tengdur at, hvussu sambandið millum tey fólk, sum starvast har, er. At vísa starvsfólkunum viðurkenning og geva sær

**Mynd 30: Kunning um týdningarmiklar avgerðir**




Sp.: *Fært tú upplýsingar um týdningarmiklar avgerðir, broytingar og framtíðarætlanir á arbeiðsplássinum í góðari tíð?*

tíð at lurta eftir teimum hevur víst seg at vera nakrir av teimum mest avgerandi faktorunum fyri trivnaðin á einum arbeiðsplássi - at vísa starvsfólkunum at tú sært og hoyrir tey og metir teirra arbeiði høgt.[22]

## Starvsfelagar

Sambært tølunum niðanfyri vísir tað seg, at mesta stuðul og feedback í arbeiðinum fáa sjúkrarøktarfrøðingar frá starvsfeløgum, tó at fakliga sparring og at "rósa hvør øðrum" ikki sýnist at vera nakað, sum verður gjørt í stóran mun.

**Talva 11: Samstarv, feedback og stuðul millum starvsfelagar**

| | Altíð | Ofta | Onkuntíð | Sjáldan | Ongantíð/ Næstan ongantíð | Vantar/Ikki svarað | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu ofta fært tú hjálp og stuðul frá starvsfeløgunum? | 18% | 45% | 27% | 6% | 1% | 2% | 407 |
| Hvussu ofta eru starvsfelagarnir til reiðar at lurta eftir tínum trupulleikum í arbeiðinum? | 22% | 47% | 24% | 4% | 2% | 2% | 407 |
| Hvussu ofta tosar tú við starvsfelagarnar um, hvussu gott tú gert títt arbeiði? | 1% | 13% | 34% | 30% | 20% | 1% | 408 |
| Hvussu ofta tosar tú við starvsfelagarnar um, hvussu gott tey gera sítt arbeiði? | 3% | 24% | 41% | 23% | 8% | 1% | 409 |
| Hvussu ofta hevur tú fakliga sparring við starvsfelagarnar (t.d. vegleiðing/supervisjón)? | 1% | 14% | 32% | 30% | 22% | 1% | 410 |

63% av teimum spurdu siga, at teir altíð ella ofta fáa hjálp frá starvsfeløgum og 69%, at starvsfelagar altíð ella ofta eru til reiðar at lurta eftir teirra trupulleikum í arbeiðinum. Vit eiga at leggja merki til, at einans 14% siga, at teir tosa altíð ella ofta við starvsfelagarnar um, hvussu gott teir gera sítt arbeiði og einans 15% siga seg altíð ella ofta at hava fakliga sparring við starvsfelagar.

[22] Sí www.sygeplejersken.dk, blad nr.16/2006 og www.ami.dk, Arbejdsmiljøinstituttet.

## Samsýning

Partur av stuðlinum í arbeiðinum er eisini tann samsýning, ið starvsfólkini fáa fyri gjørt arbeiði. Teir vanligastu hættirnir eru at samsýna við løn, karrierumøguleikum og viðurkenning. Vit hava viðgjørt viðurkenning omanfyri og fara her at vísa, hvussu sjúkrarøktarfrøðingar meta samsýningina at vera í mun til tað arbeiði, teir gera.

Sum sæst á myndunum, so vísir tað seg at vera ein stór ónøgd við samsýning fyri arbeiðsnøgd og ábyrgd. Heili 87% meta, at samsvar ikki er millum arbeiðsnøgd, ábyrgd og løn. Einans ávikavist 10% og 8% halda samsvarið millum løn, arbeiðsnøgd og ábyrgd at vera hóskandi.[23]

Hetta var eisini nakað, sum stórur dentur var lagdur á í teimum innleiðandi samrøðunum við sjúkrarøktarfrøðingar kring í landinum.

**Mynd 31: Samsvar millum arbeiðsnøgd og løn**




*Sp.: Hvussu metir tú samsvarið vera ímillum arbeiðsnøgdina og lønina?*

**Mynd 32: Samsvar millum ábyrgd og løn**




*Sp.: Hvussu metir tú samsvarið vera ímillum ábyrgdina tú hevur í arbeiðinum og lønina?*

Hetta sæst eisini aftur í teimum skrivligu viðmerkingunum.

*“ Tann løn vit fáa útgoldna,, samsvarar als ikki við tað arbeiðsbyrðu vit uppliva dagliga + ta ábyrgd, vit hava, sum sjúkrarøktarfrøðingar.... Lítla lønin elvir til*

[23] Til sammetningar, so søgdu 32% av lærarunum í áður nevndu kanning av trivnaði hjá lærarum, at samsvarið millum løn og arbeiðsnøgd var hóskandi. Kortini søgdu 63% av teimum, at arbeiðsmongdin var antin alt ov stór ella eitt sindur ov stór í mun til lønina.

*irritatión, líkasælu, manglandi engagement, undirlutakenslur, you name it....”* (SRF, 39-49ár).

*“ Lønin er ov lág í mun til tað stóru ábyrgd vit hava”* (SRF, 39-49 ár*).*

*“... Skuldi avgjørt verið nógv størri viðbøtur fyri skeivar arbeiðstíðir, og tað stóru ábyrgd ein hevur sum sj.r.frøðingur”* (SRF, 29-39 ár).

*“...Nakrar orsøkir til at eg eri ónøgd.. tað eru ringar arb.tíðir at arb. skiftandi vaktir, jól, veekendir, høgtíðir. Tá burdi lønin veri nógv hægri, tí ein “ofrar” so nógv annað. T.d. sosiala lívið og familjulív sum heild. Ein eldist skjótari av náttarv., og vandi fyri bróstkrabba er øktur”* (SRF, 29-39 ár).

*“ Vanligur sjúkrarøktarfrøðingar fáa alt ov lítla løn í mun til aðrar fakbólkar og útbúgving. Úrtíðarlønin er ov lítil, og lønin hækkar alt ov lítið við starvsaldur. Einasti møguleikin at fáa betur løn er at taka eina leiðaraútbúgving. Skulu vit fáa nýggjar sjúkrarøktarfrøðingar og fáa tey at verða verandi í starvinum er at hækka normeringina og lønina munandi.”* (SRF, 49-59 ár).

## Samandráttur

Sambært kanningini eru ein stórur partur av teimum spurdu antin sera væl nøgdir ella nøgdir við sosiala umhvørvið á arbeiðsplássinum. Hóast ein meiriluti lýsir viðurskiftini millum starvsfelagarnar sum góð og umhvørvið sum opið og fakliga kveikjandi, eru tað kortini annar hvør sum heldur, at tað eru nógvar óloystar ósemjur. Vit spurdu eisini sjúkrarøktarfrøðingarnir, hvørjar orsøkirnar, teir hildu vera til, at tað vóru fleiri ósemjur. Kanningin vísir, at meiri enn helmingurin halda, at leiðslustílurin er ein orsøk til ósemjurnar. Somuleiðis sigur annarhvør, at viðurskiftini millum leiðslu og starvsfólk eru antin minni góð ella als ikki góð.

Ein meiriluti av teimum spurdu meta, at nærmasti leiðari raðfestir trivnað á arbeiðsplássinum einans lutvíst, í lítlan mun ella í sera lítlan mun. Í mun til at leggja arbeiðið til rættis og at loysa konfliktir meina ein stórur meiriluti, at teirra nærmasti leiðari dugir lutvíst, í lítlan mun ella sera lítlan mun at leggja arbeiðið til rættis og loysa konfliktir. Somuleiðis siga meira enn ein triðingur, at teir

ongantíð/næstan ongantíð tosa við sín nærmasta leiðara um, hvussu væl teir gera sítt arbeiði og hava fakliga sparring við viðkomandi. Í teimum skrivligu viðmerkingunum bera fleiri fram ónøgdsemi við onnur lið í fyrisitingini í heilsuverkinum eisini. Tá talan er um supervisjón - professjónellan stuðul – eru meiri enn helvtin illa ella sera illar nøgdir.

Ein stórur meiriluti meta, at samsvar ikki er millum arbeiðsnøgd, ábyrgd og løn.

# 7. Partur: Tey nøgdu og tey ónøgdu

## Eyðkenni við teimum nøgdu og ónøgdu

Okkara kanning vísir, at meira enn fimti hvør av teimum spurdu ikki trívast í starvinum og harafturat, at 60% av sjúkrarøktarfrøðingunum umhugsa at søkja annað starv. Tí er tað týdningarmikið at kanna, hvussu ber til at økja um nøgdsemið og at minka um hugin at flyta í annað starv.

Í hesum parti verða sjúkrarøktarfrøðingarnir býttir í tveir bólkar, *tey nøgdu* og *tey ónøgdu*. "Tey nøgdu" eru tey, sum í stóran ella ávísan mun siga seg vera nøgd, meðan "tey ónøgdu" eru tey, sum í minni mun ella als ikki siga seg vera nøgd.

Í partinum um nøgdsemi millum sjúkrarøktarfrøðingar sóu vit, at 79% av sjúkrarøktarfrøðingum í stóran ella ávísan mun eru nøgd við sítt starv. Hinvegin so vísti kanningin eisini, at 21% í minni mun ella als ikki vóru nøgd við sítt starv. Fyri at fáa betur greiði á, hvørji viðurskifti hava ávirkan á, um fólk trívast ella ikki, fara vit at hyggja eftir, hvørji tey nøgdu og tey ónøgdu eru, og hvat tey serliga eru nøgd ella ónøgd við. Hetta er ein týdningarmikil liður í kanningini, ið kann geva ábendingar um, hvørji øki skulu bøtast fyri at økja um trivnaðin.

### *Nøgdsemi og aldur*

**Mynd 33: Aldur**




Sp.: *Aldur?*

Um hugt verður at aldursbýtinum, so sæst á mynd 33, at millum tey nøgdu eru allir aldursbólkar rímiliga javnt umboðaðir, meðan teir yngru aldursbólkarnir eru betri umboðaðir millum tey ónøgdu. Ein meiriluti av teimum ónøgdu eru millum 25-44 ár (64%). Kanningar aðrastaðnis (t.d. Benner, 1995) vísa, at

nøgdsemi við arbeiðið veksur við aldrinum. Sambært t.d. Benner eru orsøkirnar til, at nøgdsemið veksur við aldrinum, at teir meira tilkomnu sjúkrarøktarfrøðingarnir kenna starvið betur, tískil merkja størri ávirkan, og tey kenna seg betur før fyri at møta krøvum í starvinum. At teir eldru aldursbólkarnir eru betri umboðaðir millum tey nøgdu, kundi bent á, at hetta eisini er galdandi millum føroyskar sjúkrarøktarfrøðingar.

### *Nøgdsemi og arbeiðsøki*

Tá hugt verður at, hvar tey nøgdu og tey ónøgdu arbeiða, so er talan um eitt rímiliga javnt býti millum arbeiðsøkini – sí eisini mynd 34.

Myndin vísir tó, at av teimum ónøgdu eru lutfalsliga fleiri, sum arbeiða á sjúkrahúsum, innan heilsurøkt, ellis/røktarheim og annað, enn av teimum nøgdu. Hinvegin vísir myndin, at lutfalsliga fleiri av teimum nøgdu arbeiða innan heimarøkt, enn av teimum ónøgdu. Sambært kanningini, so eru øll tey, sum

**Mynd 34: Arbeiðsøki**




Sp.: *Innan hvat øki arbeiðir tú?*

arbeiða innan sambýli, undirvísing og ráðgeving sum heild nøgd. Hesi tøl eiga tó at verða tikin við fyrivarni, tí tá sjúkrarøktarfrøðingarnir verða býttir í so nógvar bólkar, gerast tølini fyri nakrar bólkar smá, og tískil óvissan størri.

### *Nøgdsemi og arbeiðstíðir*

Hyggja vit eftir, um samband er millum vakt í arbeiðinum og nøgdsemi, so síggja vit, at millum tey nøgdu eru lutfalsliga fleiri, sum arbeiða dagvakt enn

**Mynd 35: Vakt í arbeiðinum**




Sp.: *Hvørja vakt hevur tú vanliga í tínum arbeiði?*

millum tey ónøgdu. Hinvegin vísa tølini, at millum tey ónøgdu arbeiða fleiri í skiftandi vaktum enn millum tey nøgdu.

### *Nøgdsemi og sjúkrafrávera*

Tal av sjúkradøgum verður ofta nýtt sum eitt gott mát fyri trivnaðin á einum arbeiðsplássi. Hendan kanningin vísir eisini, at samband er ímillum nøgdsemi og sjúkrafráveru.

**Mynd 36: Sjúkradagar**




Sp.: *Hvussu nógvar sjúkradagar hevur tú havt í arbeiðinum teir seinastu 12 mánaðirnar?*

Hyggja vit eftir muninum millum tey nøgdu og tey ónøgdu, síggja vit, at millum tey nøgdu eru nógv fleiri sum ongan sjúkradag hava havt. Heili 32% av teimum nøgdu hava ongan sjúkradag havt teir seinastu 12 mánaðirnar, meðan 18% av teimum ónøgdu ongan sjúkradag hava havt. Hinvegin síggja vit, at millum tey ónøgdu eru nógv fleiri, sum hava havt fleiri enn 14 sjúkradagar enn millum tey nøgdu. Nærum fjórði hvør av teimum ónøgdu hevur havt fleiri enn 14 sjúkradagar teir seinastu 12 mánaðirnar. Av teimum nøgdu hava einans ein av átta havt fleiri enn 14 sjúkradagar.

### *Nøgdsemi og umhugsa at søkja annað starv*

Eitt annað gott mát fyri trivnað er í hvønn mun sjúkrarøktarfrøðingar umhugsa at søkja annað starv. Her síggja vit greiðan samanhang millum nøgdsemi og í hvønn mun sjúkrarøktarfrøðingar umhugsa at søkja annað starv. Av teimum nøgdu eru nógv fleiri, sum siga, at tey ikki umhugsa at søkja annað starv enn millum tey ónøgdu. Hinvegin vísir myndin, at millum tey ónøgdu eru nógv fleiri, sum umhugsa at søkja annað starv.

**Mynd 37: Umhugsað at søkt annað starv**




Sp.: *Hevur tú av álvara umhugsað at søkt annað starv seinastu árini?*

### *Nøgdsemi broytt seinnu árini*

**Mynd 38: Nøgdsemi broytt seinnu árini**




Sp.: *Er títt nøgdsemi við arbeiði broytt seinnu árini?*

Tað eru lutfalsliga fleiri av teimum nøgdu, ið siga at nøgdsemið er broytt til tað betra seinnu árini. Hinvegin heldur ein lutfalsliga stórur partur av teimum ónøgdu, at nøgdsemið er broytt til tað verra seinnu árini. Tað ber ikki beinleiðis til at staðfesta í hesi kanning, hví so er. Men, hugsast kann, at ávikavist tey nøgdu og ónøgdu hava ymiskan hugburð til broytingar og umleggingar í teirra arbeiði.

### *Tað góða arbeiðið*

Nøgdsemi hevur eisini stóran týdning, tá sjúkrarøktarfrøðingar skulu lýsa *tað góða arbeiðið.* Kanningin vísir, at tað er ein greiður samanhangur millum

**Mynd 39: Tað góða arbeiðið**




Sp.: *Heldur tú, at tað er samsvar millum arbeiðið, sum tú hevur nú og "tað góða arbeiðið", sum tú hugsaði um í svarinum omanfyri?*

nøgdsemi og hugburðin til starvið, sum teir lýsa sum tað góða arbeiðið.

Heili 73% av teimum nøgdu halda, at tað í stóran ella ávísan mun er samsvar ímillum teirra arbeiði og tað, sum tey lýsa sum tað góða arbeiðið. Hinvegin halda 81% av teimum ónøgdu, at tað í minni mun ella als ikki er samsvar millum teirra starv og tað, sum tey lýsa sum tað góða arbeiðið.

### *Krøv og nøgdsemi*

Alment kunnu vit siga, at tað er ikki stórvegis munur á, hvussu tey nøgdu og ónøgdu meta krøvini í arbeiðinum.

**Mynd 40: Kvantitativ krøv**




Hyggja vit eftir myndini, síggja vit, at í mun til kvantitativ krøv so eru ikki stórvegis munir á, hvussu tey kenna tey kvantitativu krøvini. Tó er ein lítil munur á, hvussu ávikavist tey nøgdu og ónøgdu kenna krøvini til at arbeiða yvir, og um tey ofta ikki náa allar arbeiðsuppgávurnar.

Harumframt siga ávikavist 22% og 44% av teimum nøgdu, at tey ofta og onkuntíð ikki náa allar arbeiðsuppgávurnar, har 37% og 34% av teimum ónøgdu

siga tað sama. Av teimum nøgdu siga 42%, at tað onkuntíð er neyðugt at arbeiða yvirtíð, har 52% av teimum ónøgdu siga hetta.

Vit hava eisini samanborið hugburðin hjá teimum nøgdu og ónøgdu í mun til tal av brúkarum/sjúklingum fyri hvønn sjúkrarøktarfrøðing.

**Mynd 41: Tal av brúkarum/sjúklingum fyri hvønn sjúkrarøktarfrøðing er nøktandi**




Sp.: *Í hvønn mun er talið av brúkarum/sjúklingum fyri hvønn sjúkrarøktarfrøðing á arbeiðsplássinum nøktandi?*

Sum sæst á mynd 42, so er ein lítil munur á, hvussu ávikavist tey nøgdu og ónøgdu meta hesi viðurskifti. Ávikavist 52% og 25% av teimum nøgdu halda talið av brúkarum/sjúklingum fyri hvønn sjúkrarøktarfrøðing í ein ávísan mun og í minni mun vera nøktandi. Hinvegin so halda ávikavist 44% og 35% av teimum ónøgdu, at talið av brúkarum/sjúklingum í ein ávísan mun og í minn mun er nøktandi.

**Mynd 42: Kognitiv krøv**



Í mun til kognitiv krøv síggja vit, at ein størri partur av teimum nøgdu (51%) meta, at tað ofta er neyðugt at hava yvirlit yvir nógv ymiskt samstundis og at ein størri partur av teimum ónøgdu (51%) meta, at tey mugu minnast nógv.

Av teimum nøgdu siga 54%, at tey onkuntíð koma í kensluliga torførar støður har 46% av teimum ónøgdu siga hetta. Í mun til at goyma kenslurnar siga 15% av teimum nøgdu, at tey ofta mugu goyma kenslurnar, og 27% av teimum ónøgdu siga, at tey ofta mugu goyma kenslurnar.

Samanumtikið kunnu vit siga, at tað er ikki stórvegis munur á hugburði og nøgdsemi í mun til krøv í arbeiðinum millum tey nøgdu og ónøgdu. Tað tykist sum, at krøvini í arbeiðinum ikki eru avgerandi fyri trivnaðin.

## *Ávirkan og nøgdsemi*

Hyggja vit eftir, hvussu tey nøgdu og tey ónøgdu meta ta ávirkan, tey hava í arbeiðinum, síggja vit ein greiðan mun.

**Mynd 43: Ávirkan í arbeiðinum**




Nærum helmingurin (45%) av teimum nøgdu siga, at tey altíð ella ofta hava ávirkan á, hvørjar avgerðir verða tiknar um teirra arbeiði. Hinvegin siga einans 14% av teimum ónøgdu hetta. Somuleiðis siga heili 78% av teimum nøgdu, at tey altíð ella ofta hava ávirkan á, hvat tey gera í arbeiðinum samanborið við 49% av teimum ónøgdu. Hyggja vit eftir nøgd av arbeiði, síggja vit eisini mun á

hugburði. 33% av teimum nøgdu sig seg altíð ella ofta hava ávirkan á nøgd av arbeiði, har einans 11% av teimum ónøgdu siga at tey altíð ella ofta hava hesa ávirkan.

Omanfyri sóu vit at stór ónøgd var við møguleikarnar fyri førleikamenning og eftirútbúgving. Ein stórur meiriluti (72%) halda, at møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving í minni mun ella als ikki eru nøktandi.

**Mynd 44: Møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving og nøgdsemi**




Sp.: *Heldur tú, at møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving eru nøktandi?*

Samanbera vit tey nøgdu og ónøgdu í mun til hesa dimensjón, síggja vit ein greiðan mun á støðuni. 88% av teimum ónøgdu siga, at møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving antin í minni mun ella als ikki eru nøktandi. Áhugavert er, at 67% av teimum nøgdu eisini halda, at møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving ikki eru nøktandi.

### *Stuðul og nøgdsemi*

Vit síggja eisini ein greiðan mun í hugburði, tá vit sammeta tey nøgdu og ónøgdu í mun til tann stuðul, tey halda seg fáa á arbeiðsplássinum. 75% av teimum nøgdu siga, at teirra starvsfelagar altíð ella ofta eru til reiðar at lurta eftir teimum trupulleikum, tey hava í arbeiðinum. 49% av teimum ónøgdu siga tað sama um teirra starvsfelagar.

Hyggja vit eftir stuðli frá nærmasta leiðara, síggja vit, at 37% av teimum nøgdu siga, at tey altíð ella ofta fáa hjálp og stuðul frá sínum nærmasta leiðara. Hinvegin siga einans 12% av teimum ónøgdu hetta um sín nærmasta leiðara. Hyggja vit eftir, hvussu ofta tey meta leiðaran at vera til reiðar at lurta eftir trupulleikunum, teir hava í arbeiðinum, halda 48% av teimum nøgdu, at teirra nærmasti leiðari altíð ella ofta er til reiðar til hetta, meðan einans 17% av teimum ónøgdu halda hetta um sín nærmasta leiðara.

**Mynd 45: Stuðul í arbeiðinum nøgdsemi**




Somu ábending síggja vit, tá talan er um nøgdsemi, og hvørt møguleikarnir fyri supervisjón eru nøktandi. Støðuna hjá ávikavist teimum nøgdu og ónøgdu síggja vit á myndini 46. 80% av teimum ónøgdu

**Mynd 46: Møguleikarnir fyri supervisjón og nøgdsemi**




Sp.: *Hvussu ert tú nøgd við møguleikarnar fyri supervisjón á tínum arbeiðsplássi?*

siga, at tey antin eru illa ella sera illa nøgd við møguleikarnar fyri supervisjón. Hetta siga 49% av teimum nøgdu.

Tey nøgdu og ónøgdu hava eisini ymiska støðu, tá talan er um forsøgn í arbeiðinum. 58% av teimum nøgdu siga, at tey í minni mun ella als ikki verða kunnað um týdningarmiklar avgerðir í góðari tíð. 89% av teimum ónøgdu siga, at tey í minni mun ella als ikki fáa upplýsingar um týdningarmiklar avgerðir í góðari tíð.

**Mynd 47: Forsøgn í arbeiðinum og nøgdsemi**




Sp.: *Fært tú upplýsingar um týdningarmiklar avgerðir, broytingar og framtíðarætlanir á arbeiðsplássinum í góðari tíð?*

## Samandráttur

Vit hava nú lýst, hvørji viðurskifti eyðkenna tey nøgdu og tey ónøgdu, og hvønn hugburð tey nøgdu og tey ónøgdu hava til tey krøv, ta ávirkan og tann stuðul tey møta í arbeiðinum.

Hóast munirnir ikki eru so stórir millum nøgd og ónøgd, tá tað kemur til aldur og arbeiðsøki, so vísir kanningin, at millum tey nøgdu eru eldru aldursbólkarnir lutfalsliga størri, meðan teir yngru aldursbólkarnir eru lutfalsliga størri millum tey ónøgdu. Millum tey ónøgdu eru tey, sum arbeiða á sjúkrahúsum, innan heilsurøkt, og innan ellis- og røktarheim betur umboðað. Kanningin vísir, at millum tey nøgdu eru tey, sum arbeiða dagvakt betur umboðað, meðan millum tey ónøgdu eru tey, sum arbeiða í skiftandi vaktum betur umboðað.

Tølini vísa, at hjá teimum ónøgdu er nøgdsemið broytt til tað verra seinnu árini. Tey nøgdu hava færri sjúkradagar enn ónøgd, og at tey nøgdu umhugsa í minni mun enn tey ónøgdu at søkja annað starv. Hjá teimum nøgdu samsvarar eisini starvið betur við tað, tey lýsa, sum tað góða arbeiðið.

Samanumtikið kunna vit siga, at tað ikki sýnist at vera stórvegis munur á hugburðinum hjá teimum nøgdu og ónøgdu til tey krøv, ið tey møta í arbeiðinum. Hinvegin síggja vit ein greiðan mun á støðuni, tá talan er um ávirkan og stuðul. Tey nøgdu meta, at tey hava størri ávirkan í arbeiðinum og fáa størri stuðul frá leiðsluni enn tey ónøgdu. Støðan er rímiliga greið, tá talan er um, hvussu tey meta møguleikan fyri førleikamenning og eftirútbúgving og trivnað. Her sæst ein greiður meiriluti av bæði teimum nøgdu og ónøgdu halda, at møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving eru antin í minni mun ella als ikki nøktandi.

# 8. Partur: Samanberingar við støðuna uttanlands

## Grundarlag undir samanberingunum

Tað hava ikki verið gjørdar so nógvar trivnaðarkanningar í Føroyum, og tí er natúrligt at hyggja eftir, hvussu slíkar kanningar verða gjørdar aðrastaðni. Tað, at okkara kanningar verða lagaðar til kanningar aðrastaðni, ger tað eisini møguligt hjá okkum at samanbera úrslitini í Føroyum við úrslit úr øðrum londum.

Í hesum parti fara vit at samanbera úrslitini í hesi spurnakanning við úrslit úr eini stórari spurnablaðskanning, sum varð gjørd millum 4559 sjúkrarøktarfrøðingar í Danmark í 2002. Kanningin er gjørd av Arbejdsmiljøinstituttet (AMI) í samstarv við Danske Sygeplejeråd. AMI hevur í nógv ár arbeitt við trivnaðarkanningum. Tey hava funnið fram til ein framferðarhátt, sum kann máta ymiskar dimensjónir, sum ávirka trivnaðin m.a. nøgdsemi, krøv í arbeiðinum, ávirkan í arbeiðinum, sosialan stuðul og leiðsludygd[24]. Fyrimunurin við at nýta hesar útrokningarnar er, at tú fær eitt úrslit sum hevur størri trúvirði, tí tað er grundað á fleiri spurningar innan somu dimensjón.

Í spurnablaðnum til sjúkrarøktarfrøðingarnar í Føroyum, eru nøkur brot úr donsku kanningini tikin við, sum gera tað møguligt at samanbera trivnaðin hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum við trivnaðin hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Danmark. Í fyrsta parti varð greitt frá, at krøv, ávirkan og stuðul vísa seg at hava stóra ávirkan á trivnað á einum arbeiðsplássi. Hesir dimensjónsspurningar vórðu eisini nýttir í hesi trivnaðarkanning. Vit fara fyrst at meta, um trivnaðurin er størri í Føroyum enn í Danmark við at hyggja eftir nøgdsemi, sjúkrafráveru, og í hvønn mun sjúkrarøktarfrøðingar hugsa um at fara í annað starv. Síðani fara vit at hyggja at krøvum, ávirkan og stuðli í arbeiðinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum samanborið við sjúkrarøktarfrøðingar í Danmark. Her hava vit valt at

---

[24] Hetta verður gjørt við, at fleiri spurningar verða settir í hvørjari dimensjón. Síðani fær hvørt svar eitt virði, har mest positiva svarið fær hægsta virðið og mest negativa svarið fær lægsta virðið á einum skala frá 0-100. Eitt miðaltal verður síðani roknað út frá hesum, sum er úrslitið fyri dimensjónina.

býta tað upp í tveir partar: krøv í arbeiðinum og tilfeingið í arbeiðinum, har ávirkan og stuðul verða sæð sum tilfeingi í arbeiðinum.

## Nøgdsemi

Nøgdsemi kann mátast við at spyrja um nøgdsemi sum heild, ella við at spyrja um nøgdsemi við ávís viðurskifti á arbeiðsplássinum. Trivnaðarkanningar hjá AMI brúka fýra spurningar, sum tey síðani leggja saman til at lýsa nøgdsemis-dimensjónina. Her verður spurt um:

**Mynd 48: Nøgdsemi í arbeiðinum**




- nøgdsemi við framtíðarvánir
- nøgdsemi við arbeiðsumhvørvið sum heild
- nøgdsemi við mátan evnini verða nýtt
- nøgdsemi við sosiala arbeiðsumhvørvið

Svarini til hesar spurningarnir fáa øll eitt virði millum 0 og 100. Mest positiva virðið fær 100, meðan mest negativa svarið fær 0. Eitt samlað virði hjá teimum 414, sum hava svarað spurningunum, verður roknað út. Síðani verður eitt miðaltal roknað út fyri allar fýra spurningarnar og hetta gevur so tað, sum vit kalla fyri *arbeiðsnøgdsemisvirði*.

Okkara kanning vísir, at arbeiðsnøgdsemisvirðið hjá sjúkrarøktarfrøðingum er 58. Hetta sigur í sær sjálvum ikki so nógv, men um vit samanbera hetta við tøl hjá AMI, so sæst, at arbeiðsnøgdsemið hjá føroyskum sjúkrarøktarfrøðingum er 10 virði lægri enn hjá donskum sjúkrarøktarfrøðingum og 7 lægri enn miðalvirðið hjá donsku arbeiðsmegini[25].

[25] Tølini eru frá AMI. Miðalvirði fyri arbeiðsnøgdsemi hjá 56 arbeiðsbólkum í donsku arbeiðsmegini. Tølini liggja inni á heimasíðuni hjá AMI www.ami.dk

So hóast vit í spurnakanningini síggja, at nøgdsemið hjá føroysku sjúkrarøktarfrøðingunum er rímiliga høgt, um vit bert máta nøgdsemi sum heild, so er tað lægri enn nøgdsemið millum danskar sjúkrarøktarfrøðingar, tá vit brúka dimensjónsspurningin.

## Sjúkrafrávera

Sjúkrafrávera er eisini eitt mát fyri trivnað. At tað eru nógvir sjúkradagar, kann vera tekin um, at alt ikki er í lagi á arbeiðsplássinum. Myndin vísir, at sum heild hava sjúkrarøktarfrøðingar í Danmark hægri sjúkrafráveru enn sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum. Hetta kann hava nakað við trivnaðin at gera, men ein eigur eisini at hava í huga, at familjumynstrið í Føroyum kann hava týdning í hesum føri. Við hesum meinast við, at ein sjúkrarøktarfrøðingur í Føroyum møguliga hevur lættari atgongd til familjuna sum netverk. Myndin vísir, at nærum ein triðingur av sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum hava ongan sjúkradag havt hetta seinasta árið. Hetta er munandi hægri enn í Danmark, har nærum ein fimtingur av sjúkrarøktarfrøðingunum ongan sjúkradag hevur havt.

**Mynd 49: Sjúkradagatal hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum og Danmark**




Sp.: *Hvussu nógvar sjúkradagar hevur tú havt í arbeiðinum seinastu 12 mánaðirnar?*

## Umhugsa at søkja annað starv

Í fleiri londum er tað ein trupulleiki, at sjúkrarøktarfrøðingar ikki støðast á arbeiðsplássinum. Mynd 50 vísir, at sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum umhugsa í nógv størri mun at søkja annað starv, enn sjúkrarøktarfrøðingar í Danmark. Tríggjar av fimm sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum umhugsa at søkja annað starv, meðan tveir av fimm sjúkrarøktarfrøðingum í Danmark umhugsa at søkja annað starv.

Av tí at tørvur á sjúkrarøktarfrøðingum í framtíðini helst fer at verða nógv størri enn í dag, so er tað sera umráðandi at sjúkrarøktarfrøðingar støðast í starvinum.[26]

**Mynd 50: Umhugsað at søkt annað starv**




Sp.: *Hevur tú av álvara umhugsað at søkt annað starv seinastu árini?*

## Krøv í arbeiðinum

Krøv í arbeiðinum hava vit býtt upp í kvantitativ krøv og kvalitativ krøv. Higartil hava kenslulig krøv og krøv um goymdar kenslur verið lýstar undir einum. Kensluligu krøvini kunna býtast upp í kenslulig krøv og krøv um goymdar kenslur. Við at gera hetta kann ein betri lýsing fáast av, júst hvørji kenslulig krøv tað eru, sum tyngja. Krøv í arbeiðinum kann sostatt býtast upp í fýra ymiskar dimensjónir.

- Kvantitativ krøv
- Kenslulig krøv
- Krøv um goymdar kenslur
- Kognitiv krøv

[26] Sí t.d. kanning hjá Magna Laksafoss (2006) har hann framskrivar vøksturin av teimum eldru í samfelagnum fram til 2030. Kanningin vísir, at tørvurin á fólki, sum arbeiða innan heilsuverkið fer at økjast nógv komandi árini.

Mynd 51: Krøv í arbeiðinum




Við støði í hesum síggja vit, at munurin á krøvunum er ikki so stórur, tá samanborið verður millum sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum og í Danmark. Hóast arbeiðsvikan hjá sjúkrarøktarfrøð-ingum í Danmark er 37 tímar, meðan hon er 40 tímar hjá sjúkra-røktarfrøðingum í Føroyum, vísa tølini, at sjúkra-røktarfrøðingarnir uppliva kvantitativu krøvini nøkulunda eins. Sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum og Danmark uppliva kensluligu krøvini eins. Tó síggja vit, at sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum kenna krøv um at goyma sínar kenslur og kognitivu krøvini eitt sindur hægri enn í Danmark. Ein orsøk til hetta kann vera, at viðurskiftini í Føroyum eru smærri, og at teir tí uppliva hesi krøv hægri í Føroyum.

## Tilfeingi í arbeiðinum

Hvussu høg krøvini eru í arbeiðinum sigur ikki beinleiðis nakað um trivnaðin. Tað, sum er týdningarmikið, er hvussu tilfeingið er at handfara hesi krøv. Eru krøvini høg og tilfeingið hjá sjúkrarøktarfrøðingum til at handfara hesi krøv høg, so eru krøvini eingin trupulleiki. Hinvegin um sjúkrarøktarfrøðingarnir merkja, at tilfeingið at handfara hesi krøv ikki er nøktandi, so kunna krøvini virka tyngjandi og enntá heilsuskaðilig.

Í mun til kognitiv krøv sóu vit, at ein størri partur av teimum nøgdu (51%) meta, at tað ofta er neyðugt at hava yvirlit yvir nógv ymiskt samstundis, og at ein størri partur av teimum ónøgdu (51%) meta, at tey mugu minnast nógv. Hvørjar møguleikar (resurssur) hevur sjúkrarøktarfrøðingurin at handfara hesi krøv? Tilfeingi hjá sjúkrarøktarfrøðinginum er m.a. ávirkan í arbeiðinum, sosialur

stuðul frá leiðslu og starvsfeløgum, leiðsludygd og møguleikar fyri forsøgn ("forudsigelighed") hjá sjúkrarøktarfrøðinginum í arbeiðinum.

**Mynd 52: Tilfeingi í arbeiðinum**




Mynd 52 vísir, at tilfeingi í arbeiðinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum, sum heild, er eitt sindur lægri enn hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Danmark. Ávirkan og møguleikar fyri forsøgn í arbeiðinum eru einans eitt vet minni hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum enn í Danmark. Hinvegin er munur á, hvussu sjúkrarøktarfrøðingar meta leiðsludygd verða í Føroyum og í Danmark. Donsku sjúkrarøktarfrøðingarnir geva leiðsluni 9 stig fleiri enn føroysku sjúkrarøktarfrøðingarnir geva síni leiðslu. Í partinum frammanundan hesum kom eisini fram, at nøgdsemið við leiðsluna ikki er nøktandi.

Føroysku sjúkrarøktar-frøðingarnir halda seg fáa minni stuðul í arbeiðinum enn donsku sjúkra-røktarfrøðingarnir. Um vit býta sosiala stuðulin upp í stuðul frá starvsfeløgum og stuðul frá leiðslu.

**Mynd 53: Sosialur stuðul**



Í samrøðunum frammanundan kanningini kom fram, at sjúkrarøktarfrøðingarnir brúka hvørja aðra heldur enn leiðsluna at “sparra” við. Hetta kemur týðuliga fram á mynd 53, sum vísir sosiala stuðulin samanlagt, sum er eitt miðal tal av sosiala stuðlinum frá nærmasta leiðara og starvsfeløgum. Myndin vísir, at starvsfelagarnir fáa 70 stig fyri at geva sosialan stuðul, meðan nærmasta leiðslan fær 53 stig. Danska frágreiðingin lýsir ikki hesar munir, og tí er ikki møguligt at samanbera hetta við viðurskiftini hjá donsku sjúkrarøktarfrøðingunum.

## Samandráttur

Samanumtikið kann sigast, at ein ikki fær eina einsíðuga mynd, tá sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum verða samanbornir við sjúkrarøktarfrøðingar í Danmark. Sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum eru sum heild væl nøgdir við sítt starv, men ikki eins væl nøgdir og sjúkrarøktarfrøðingarnir í Danmark. Sjúkrafráveran er væl lægri millum sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum enn í Danmark. Men samstundis eru tað nógv fleiri sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum, sum umhugsa um at søkja í annað starv, enn tað er í Danmark.

Sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum og Danmark meta kvantitativu krøvini at vera nøkulunda eins. Hinvegin meta sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum tey kvalitativu krøvini at vera hægri, enn sjúkrarøktarfrøðingarnir í Danmark meta tey. Hetta er í sær sjálvum ikki neyðturviliga ein trupulleiki, um so er, at tilfeingið til at møta hesum krøvum er samsvarandi stórt. Tað er her, at munurin er á sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum og Danmark. Sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum meta, at tilfeingið, serliga leiðsludygdin og sosialur stuðul frá leiðslu ikki er nøktandi. Tað eru serliga krøv um goymdar kenslur, sum sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum meta vera størri. Tí er júst tørvurin á góðari leiðslu og stuðul frá leiðsluni t.d. við supervisjón og herðaklapp, stórur í arbeiðinum.

# 9. Partur: Niðurstøða & tilráðingar

## Niðurstøða

Í hesi kanning hava vit viðgjørt spurningarnar, *hvussu sjúkrarøktarfrøðingar trívast í sínum arbeiði sum heild* og *í hvønn mun sjúkrarøktarfrøðingar meta, at viðurskifti, sum hava týdning fyri trivnaðin í arbeiðinum eru nøktandi.*

Viðgerðin av tilfarinum hevur verið býtt upp í tríggjar partar: *krøv, ávirkan og stuðul*. Trivnaðarkanningin hevur lýst, hvussu sjúkrarøktarfrøðingar meta hesi viðurskifti á teirra arbeiðsplássum.

Kanningin vísir, at ein meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingunum siga seg vera nøgdir í sínum starvi sum heild, og at teirra núverandi arbeiði uppfyllir tað, ið hesin bólkur metir vera eitt gott starv. Kortini eru tað viðurskifti, ið sjúkrarøktarfrøðingarnir eru ónøgdir við.

Hóast ein meiriluti sigur seg vera nøgdan sum heild, eru tað nærum tveir triðingar av sjúkrarøktarfrøðingunum í hesi kanning, ið umhugsa at søkja annað starv. Tað sýnist at vera ein andsøgn í hesum.

Harumframt er ein meiriluti av teimum spurdu í hesi kanning ónøgdur við samsýning fyri arbeiðsnøgd og ábyrgd.

Millum teir ónøgdu sjúkrarøktarfrøðingarnar eru lutfalsliga fleiri, sum arbeiða á sjúkrahúsum, innan heilsurøkt og á ellis- og røktarheimum.

Viðurskifti, ið heilsufrøðingar draga fram sum ónøktandi, eru misjavnir karmar, umframt at tey amboð, teimum tørvar í arbeiðinum, ikki eru nøktandi. Ein av orsøkunum til hetta meta heilsufrøðingarnir vera, at tað er ógreitt, um tað er kommunan ella landið, ið hevur ábyrgdina av fysisku kørmunum og amboðunum. Víst verður á, at tá karmar og amboð ikki eru nøktandi, er trupult hjá teimum at arbeiða. Ein avleiðing av hesum er, at borgarar fáa ymiskar sømdir til hesa tænastu, alt eftir hvar tey búgva.

Umleið ein triðingur av sjúkrarøktarfrøðingunum meta ikki, at lutfallið millum tal av brúkarum/sjúklingum og sjúkrarøktarfrøðingum er nøktandi. Trivnaðarkanningin vísir ikki beinleiðis, hvaðani henda ónøgd kemur, men hugsast kann, at hon fyri ein part stavar frá ellis- og røktarheimum, heimarøktini og sjúkrahúsunum. Í teimum innleiðandi samrøðunum og í teimum skrivligu

viðmerkingunum í kanningini vísa fleiri sjúkrarøktarfrøðingar ónøgd við ikki at kunna veita eina nøktandi sjúkrarøkt/tænastu, tí umstøðurnar ikki eru til tess.

Sjálvt um ein stórur meiriluti av teimum spurdu siga seg vera nøgd við sosiala umhvørvið sum heild, so heldur annar hvør sjúkrarøktarfrøðingur, at viðurskiftini millum leiðslu og starvsfólk eru ikki góð. Sjúkrarøktarfrøðingarnir vísa á, at tað eru nógvar óloystar ósemjur, og meiri enn helmingurin metir leiðsluháttin vera eina orsøk til ósemjurnar. Ónøgdin við leiðsluháttin verður eisini drigin fram í teimum skrivligu viðmerkingunum í kanningini. Tá sjúkrarøktarfrøðingarnir verða bidnir um at meta leiðsludygdina á sínum arbeiðsplássi – tað vil siga hvussu ídnar leiðslurnar eru at veita teimum stuðul og feedback - so geva føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar síni leiðslu færri stig enn til dømis danskir sjúkrarøktarfrøðingar gera.

Flestu av teimum spurdu meta, at almenningurin hevur virðing fyri starvinum hjá teimum. Hinvegin so kenna nærum tveir triðingar av sjúkrarøktarfrøðingunum í hesi kanning, at politiski myndugleikin ikki hevur so stóra virðing fyri starvinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum.

## Tilráðingar

Í hesi trivnaðarkanning hava vit nýtt eina kvantitativa tilgongd – ein tilgongd, ið byggir á mátingar við støði í talviðgerð. Ein vanligur kritikkur av tí kvantitativu tilgongdini er, at spurningarnir eru fastlagdir frammanundan og harvið eisini svarmøguleikarnir. Styrkin við at nýta eina kvantitativa tilgongd er hinvegin, at vit fáa identifiserað, um tað eru serlig øki ella viðurskifti, ið eiga at verða kannað gjøllari. Kanningin er sostatt eitt gott grundarlag fyri framhaldandi arbeiði fyri at betra um arbeiðsumhvørvið hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum.

Tilmælini taka støði í teimum royndum og fatanum, sum sjúkrarøktarfrøðingarnir í hesari kanning geva til kennar umframt í øðrum kanningum, ið viðgera og lýsa viðurskifti, sum hava týdning fyri starvsøkið:

Ein meiriluti av teimum spurdu siga seg vera nøgd sum heild í arbeiðinum. Kortini eru tað nærum tveir triðingar av sjúkrarøktarfrøðingunum í hesi kanning, ið umhugsa at søkja annað starv. Kanningin gevur nakrar ábendingar um, hví tey umhugsa at søkja annað starv, men sigur tó ikki nakað nágreiniligt um, hvørji ítøkilig viðurskifti eru orsøkir til hetta, og hvat eyðkennir tey, ið umhugsa at søkja annað starv. Hví so nógvir sjúkrarøktarfrøðingar umhugsa at søkja annað starv átti at verið kannað gjøllari.

Tørvur á sjúkrarøktarfrøðingum í framtíðini fer helst at verða nógv størri enn í dag. Trot á arbeiðsmegi í heilsuverkinum kann gerast ein samfelagsligur trupulleiki, og tí er uppaftur meira umráðandi, at sjúkrarøktarfrøðingar støðast í starvinum. Framskrivingar av fólkatalinum í Føroyum og tær avleiðingar, henda gongd kann fáa fyri samfelagið, almennu útbyggingarnar og arbeiðsmarknaðin vísa, at tørvurin á fólki, ið arbeiða innan heilsuverkið fer at økjast nógv komandi árini (Laksafoss, 2006). Talið av eldri fólki fer at hækka munandi, samstundis sum barnatalið fer at minka. Ávirkanin á heilsuverkið verður tvítáttað. Vit kunnu vænta, at tað verða færri fólk at framleiða tær tænastur, sum heilsuverkið skal veita, samstundis sum tað koma fleiri brúkarar, síðan tað eru serstakliga teir eldru aldursbólkarnir, ið nýta heilsuverkið.

Hóast ein stórur meiriluti av sjúkrarøktarfrøðingunum siga seg vera nøgdir við sosiala umhvørvið sum heild, so heldur annar hvør av teimum spurdu, at viðurskiftini millum leiðslu og starvsfólk ikki eru góð og siga seg vera ónøgdir við leiðslustílin. Teir spurningar í spurnablaðnum, sum skula lýsa leiðsluviðurskifti, eru í høvuðsheitinum um nærmastu leiðslu. Í viðmerkingunum í spurnablaðnum bera fleiri av teimum spurdu fram ónøgdsemi við leiðsluháttin, ikki einans við nærmastu leiðslu, men eisini við onnur lið í fyrisitingini í heilsuverkinum. Tað átti at verið kannað gjøllari, hvaðani henda ónøgd við leiðsluhátt stavar frá og hví. Hetta tí, at arbeiðsumhvørvið á teimum einstøku arbeiðsplássunum er eitt samspæl millum tey starvsfólk, ið har arbeiða, leiðsluna og fjarumhvørvið. Á henda hátt fæst meiri ítøkilig vitan um tey krøv, ið starvsfólk og leiðslur kenna, eru knýtt at tænastunum, tey skulu veita. Somuleiðis fæst eisini meiri ítøkilig vitan um, hvørjar uppgávur og mál tey skulu

røkka og tann stuðul í arbeiðinum, sum leiðslur og starvsfólk kenna seg hava atgongd til á sínum arbeiðsplássi.

## Bókmentir og keldur

**Agervold, Mogens** (1998). *Spørgeskema til psykosocialt arbejdsmiljø – kortlægning og ændring.* Arbejdsmiljørådets Service Center.

**Albertsen, Karen** (2006). *Indflydelse på vaktskema give større tilfredshed.* www.ami.dk

**Arbejdsmiljøinstituttet.** *Psykisk arbejdsmiljø. Kort spørgeskema til vurdering af det psykiske arbejdsmiljø.*http://www.ami.dk/upload/kortspoergeskema2.pdf.

**Bjørnson, Kirsten** (2006). "Tilliden til ledelsen er vigtigere end indflydelse." *Sygeplejersken*, blad nr. 16/2006.

**Brenner, P.** (1995). *Fra novis til expert: dgtighet og styrke i klinisk sykeplejepraksis.* Oslo: TANO.

**Bøggild, H., et al.** (2001). "Work environment of Danish shift and day workers." *Scandinavian Journal of Work, Environment & Healt*. 2001; 27: ss 97-105.

**Christiansen, Jørgen Møller, Nørby, Hanne, Agevorld, Mogens** (2001). *Psykisk arbejdsmiljø i praksis. Metoder og værktøjer.* Personalestyrelsen, Finansministeriet. Centralorganisationernes Fællesudvalg.

**Crose, Patricia S.** (1999). "Job Characeteristics Related to Job Satisfaction in Rehabilitation Nursing." *Rehabilitation nursing: the official journal of the Association of Rehabilitation Nurses.* 1999, May-jun; 24(3): 95-102.

**Davis, S., et al.** (2001). "Night shift work, light at night, and risk of breast cancer". *Journal of the National Cancer Institute*. 2001;93(20):1557-1562.

**Hasselhorn, H.M., Tackenberg, P., Müller, B.H.** (2003). *Working conditions and intent the profession among nursing staff in Europe.* SALTSA. Report No 7: 2003.

**Heijden, Beatrice van der & Kuemmerling, Angelika** (2003). "Social work environment and nurses' commitment." Í Hasselhorn, H.M., Tackenberg, Peter, Müller: *Working conditions and intent the profession among nursing staff in Europe.* SALTSA. Report No 7: 2003.

**Herzberg, F.** (1966). *Work and the Nature of Man*, Cleveland, Oh.: World Publishing Company.

**Hovgaard, Gestur & West, Hallbera** (2003). *Rekruttering av høgt útbúnari arbeiðsmegi til fiskivinnuna.* Arbeiðsrit nr. 4/2003. Klaksvík. Granskingardepilin fyri Økismenning.

**Karasek, R. & Theorell, T.** (1990). *Healthy Work: Stress, Productivity, and the Reconstruction of Working Life*. USA: Basic Book.

**Kjeldsen, Susanne Bloch** (2006). "Ønsk din egen vagtplan." *Sygeplejersken*, blad nr. 16/2006.

**Laksafoss, Magni** (2006). "Eftirlýsing – Mammur." *Frøði* nr. 1/2006. 12. árgangur. ss. 10-15.

**Lanssjúkrahúsið** (2005): Ársfrágreiðing. www.lsh.fo.

**Mortensen, Bjarni** (2002). *Lærari í Føroyum 2002 – limakanning hjá Føroya Lærarafelag*. Arbeiðsrit nr. 2/2002. Vágur. Granskingardepilin fyri Økismenning.

**Stordeur, Sabine et al.** (2003). "Leadership, job satisfaction and nurses' commitment." Í Hasselhorn, H.M., Tackenberg, Peter, Müller: *Working conditions and intent the profession among nursing staff in Europe*. SALTSA. Report No 7: 2003.

**Staff, Trine** (2002). *Jobbtrivsel hos nyutdannede sykeplejere – En empirisk studie av hvordan psykososialt arbeidsmiljø henger sammen med trivsel i sykehusavdelingen og yrke.* Hovedfagsopgave. Det Medisinske fakultet/Det Psykologiske Fakultetet.

**Tackenberg, Peter, et al.** (2003). "Nursing in Europe." Í Hasselhorn, H.M., Tackenberg, Peter, Müller: *Working conditions and intent to leave the profession among nursing staff in Europe.* SALTSA. Report No 7: 2003.

**Wethje, Annette, Borg, Vilhelm** (2003). *Sygeplejerskers arbejdsmiljø, trivsel og helbred (SATH). Balancen mellem arbejds- og privatlivet.* Dansk Sygeplejeråd og Arbejdsmiljøinstituttet.

## Greinar í Føroyskum bløðum:

**Dimmalætting** (www.dimma.fo)

Jacobsen, Randi (2006). "Færri innleggingar." *Dimmalætting*, 18 oktober.

Landssjúkrahúsið. "Er føroyska heilsverkið nóg gott." *Dimmalætting*, 18 oktober 2006

Gaard, Heini (2006). "Uppgav sítt lívstarv sum sjúkrasystir". *Dimmalætting*, 18. september.

Gaard, Heini (2006). "Almanna og Heilsumálaráðið í verjustøðu". *Dimmalætting* 23. mei.

Gaard, Heini (2006). "Sparingar raka medisinska depilin harðast". *Dimmalætting*, 2. februar, 2006.

**Sosialurin** (www.sosialurin.fo)

Lindenskov, Eirikur (2006) Og landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum hevur púra rætt." *Sosialurin*, 11 september.

Ellingsgaard, Anna V. (2005). "Sjúkrarøktarfrøðisskúlin gongur á odda". *Sosialurin,* 27 desember

Bertholdsen, Áki (2005). "Umleggingarnar á føðideildini skeinkaðar". *Sosialurin* 18. mai.

Dam, Rigmor (2005). " Norðurlendskar forkvinnur á stýrisfundi". *Sosialurin*, 15. mai

Skaale, Eydna (2005). " Hvat er hent á føðideildini? *Sosialurin*, 9. mai.

Ellingsgaard, Anna V. (2005) "Vit geva ikki eftir". *Sosialurin*, 4 mai.

Bertholdsen, Áki (2005). "Umleggingin á føðideildini lagað til ynskini frá barnalæknunum". *Sosialurin* 25. apríl.

Bertholdsen, Áki (2005). "Føðideildin: Starvsfólkið skal vera við at leggja arbeiðið til rætis". *Sosialurin* 25. apríl.

Bertholdsen, Áki (2005). "Landssjúkrahúsið: Stríðið um føðideildina er harðnað". *Sosialurin* 15. apríl.

Bertholdsen, Áki (2005). “Avgerðin tikin: Um ein mánað verður føðideildin umskipað”. *Sosialurin* 15. apríl.

Dalsgaard, Jana H (2005). “Sjúklingurin stóri taparin.” *Sosialurin*, 6. apríl 2005

Pedersen, Beinta (2005). “Svar til Annemi Joensen.” *Sosialurin*, 6. apríl 2005

Tyril, Sunneva (2005). “Munur er á kvinnum. “ *Sosialurin*, 6. apríl 2005

Rasmussen, Ingi (2002). “Systrar gerast frøðingar”. *Sosialurin* 19. desember.

**Útvarp Føroya (www.uf.fo)**

20-09-2006 Tingfólk mæla til uttveltaða kanning av landssjúkrahúsinum.

2-09-2006 Trot á pengum og serlæknum lækkað sjúkrahússtøði.

6-05-2005 Seinasta orið ikki sagt um bygnaðarbroytingar á LS.

18-03-2005 Sjúkrarøktarar taka umleggingarnar sum krígsavbjóðing.

**Heimasíður:**

www.ahr.fo

www.ami.dk

www.dsr.dk

www.efnweb.org

www.lsh.fo

www.nursingworld.org

www.ssf.fo

www.who.int

## Ískoyti: Spurnarblað

# Sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum ár 2006.

- ein trivnaðarkanning.

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur sum endamál at samla, verja og arbeiða fyri áhugamálunum hjá limunum í felagnum. Harímillum eru eisini viðurskifti, sum ávirka trivnaðin hjá sjúkrarøktarfrøðingum. Fyri at fáa eina greiða ábending um, hvussu trivnaðarviðurskiftini hjá limunum í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar eru, hevur felagið heitt á Granskingardepilin fyri Økismenning um at skipa fyri einari trivnaðarkanning millum limirnar. Endamálið við kaningini er at fáa eina heildarmeting av, hvussu sjúkrarøktarfrøðingar trívast í starvinum. Ætlanin er, at kanningin skal brúkast sum ein liður í dagliga arbeiðinum hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar at bøta um hesi viðurskifti.

Tygum eru ein av teimum 746 limunum í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava fingið sent spurnarblað í samband við kanningina. Spurnarblaðið inniheldur spurningar um ymisk viðurskifti, sum hava ávirkan á trivnaðin millum limirnar hjá felagnum.

Kanningin er anonym. Tað einstaka spurnarblaðið verður ikki sjónligt í sjálvari frágreiðingini. Í slíkum kanningum er tað heildin, sum er áhugaverd fram um tað einstaka spurnarblaðið. Eftir at spurnarbløðini eru savnaði inn, og svarini lisin inn í telduforrit á Granskingardeplinum fyri Økismenning, verða spurnarbløðini burturbeind – hetta eisini fyri at tryggja anonymitet. Somuleiðis hava granskarar á Granskingardeplinum fyri Økismenning tagnarskyldu í smb. við spurnarblaðskanninginar. Seinni í heyst kemur út frágreiðing um trivnaðarviðurskiftini hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum, sum er grundað á hesa kanning.

Tað er týdningarmikið fyri úrslitið av kanningini, at so nógv sum gjørligt svara spurnarblaðnum. Tað er sjálvboðið at taka lut í kanningini, og heitt verður á tygum um at vera so beinasom at svara spurnarblaðnum. Um tygum velja at svara spurnarblaðnum, so skulu tygum leggja tað í viðlagda brævbjálva. Spurnarblaðið skal sendast beinleiðis til Granskingardepilin fyri Økismenning, deildin í Suðuroy, FO 900 Vágur, innan 23. juni 2006.

Trivnaðarkanningin er fráboðað Dátueftirlitinum, sum hevur givið loyvi til at gera kanningina.

Hava tygum spurningar um kanningina, kunnu tygum ringja til Marthu H. Mýri á Granskingardeplinum fyri Økismenning, sum hevur ábyrgdina av kanningini, á tlf. 45 77 44. Kanningin er fíggjað av Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og verður væntandi liðug í oktober mánaða 2006, tá frágreiðing verður almenn.

Vinarliga

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
Lucas Debesar gøta 14 ∗ 100 Tórshavn ∗ Tlf. 311309 ∗ Telefontíð má., tý., fr., kl. 9-13.00,
hó. Kl 13-17.00.

# Sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum

Niðanfyri er heitið **sjúkrarøktarfrøðingur** nýtt um allar limir hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Hetta av praktiskum ávum. Hevur tú serútbúgving sum t.d. heilsufrøðingar, narkosusjúkrarøktarfrøðingar, heimasjúkrarøktarfrøðingar, leiðari o.s.fr. verður tú biðin um **at tilskila hetta í spurningi 7 og 7b.**

## Um teg

**1. Kyn:** ☐₁ Kvinna ☐₂ Maður

**2. Aldur:** _____ ár

**3. Hjúnalagsstøða:** ☐₁ Gift/sambúgvandi ☐₂ Ógift/-ur ☐₃ Einkja/Einkjumaður ☐₄ Sundurlisin

**4. Bústaður:**
☐₁ Norðoyggjar ☐₄ Streymoy annars ☐₇ Sandoy
☐₂ Norður Eysturoy ☐₅ Suðurstreymur ☐₈ Suðuroy
☐₃ Suður Eysturoy ☐₆ Vágunum

**5. Hvussu nógv heimabúgvandi børn hevur tú?** **Tal:** _______

## Formlig arbeiðsviðurskifti

**6. Hvat ár vórðu tygum útbúgvin sum sjúkrasystir/sjúkrarøktarfrøðingur?** _______

**7. Hevur tú serútbúgving, umframt útbúgvingina, sum sjúkrarøktarfrøðingur?** ☐₁ Ja ☐₂ Nei

**7b. Um ja, hvørja?** ________________________________________

**8. Hvør er støða tín á arbeiðsmarknaðinum í løtuni?** *(set bert ein kross)*
☐₁ Eg arbeiði ☐₃ Eg eri í farloyvi ☐₅ Eg eri arbeiðsleys ☐₇ Annað_______________
☐₂ Eg eri lesandi ☐₄ Eg eri sjúkrameldað ☐₆ Eg eri vikarur

Um tú t.d. ert í farloyvi ella ert sjúkrameldað, skalt tú svara spurnablaðnum út frá teimum royndum, tú hevur frá tí arbeiðsstaði, tú ert í farloyvi ella ert sjúkrameldað frá. Um tú ert lesandi skalt tú svara spurnablaðnum út frá royndum, tú hevur í núverandi praktikkplássi. Um tú ert avloysari, vikarur ella tílíkt, skalt tú svara spurnablaðnum út frá teimum royndum, tú hevur í tínum núverandi arbeiðsstaði.

**9. Innan hvat øki arbeiðir tú?** *(set bert ein kross)*
☐₁ Sjúkrahús ☐₃ Ellis/Røktarheim ☐₅ Sambýli o. tílíkt ☐₇ Undirvísing/Ráðgeving
☐₂ Heilsurøkt ☐₄ Heimarøkt ☐₆ Læknaviðtalu ☐₈ Annað________________

**10. Hvussu nógv arbeiðir tú vanliga um vikuna sum sjúkrarøktarfrøðingur?**
☐₁ Fulla tíð ☐₂ Niðursetta tíð/Setanarbrøkur ____________ ☐₃ Hálva tíð ☐₄ Annað _____________

**11. Kundi tú hugsað tær?** ☐₁ At fari niður í tíð ☐₂ At arbeitt meira ☐₃ Núverandi tíðin er nøktandi

**12. Hvørja vakt hevur tú vanliga í tínum arbeiði?**
☐₁ Dagvakt (millum 06-18) ☐₃ Náttarvakt (22-08) ☐₅ Annað: __________________
☐₂ Kvøldvakt (Millum 15-24) ☐₄ Skiftandi vaktir

**13. Hvussu trívist tú við at arbeiða náttarvakt?** *(set bert ein kross)*
☐₁ Sera væl ☐₃ Nøkulunda ☐₅ Sera illa
☐₂ Væl ☐₄ Illa ☐₆ Arbeiði ikki náttarvakt

**14. Hevur tú hjástarv?** ☐₁ Ja ☐₂ Nei

**14b. Um ja, hvussu nógvar tímar arbeiðir tú í meðal um vikuna við hesum?** ______________ **tímar**

**15. Hvussu nógvar sjúkradagar hevur tú havt í arbeiðinum teir seinastu 12 mánaðirnar?** _______
*(Skriva tal av heilum døgum)*

**15b. Hvørjar eru orsøkirnar til, at tú hevur havt sjúkradagar?** *(tú kanst seta fleiri krossar)*

- ☐1 Umfarsjúka
- ☐2 Kronisk sjúka
- ☐3 Trupulleikar í viðgongutíð
- ☐4 Sjúkt barn
- ☐5 Arbeiðsskaði
- ☐6 Strongd
- ☐7 Veit ikki
- ☐8 Havi ikki havt nakran sjúkradag
- ☐9 Annað_____________________

## Fakligur førleiki og møguleikar fyri menning í arbeiðinum

**16. Hvussu metir tú tín fakliga førleika at vera í mun til krøvini í tínum starvi?** *(set bert ein kross)*

- ☐1 Sera góður
- ☐2 Góður
- ☐3 Nøktandi
- ☐4 Ikki nóg góður
- ☐5 Als ikki nóg góður
- ☐6 Veit ikki

**17. Heldur tú, at tey fakligu krøvini sum heild eru broytt seinastu árini?** *(set bert ein kross)*

- ☐1 Tey eru økt í stóran mun
- ☐2 Tey eru økt í ávísan mun
- ☐3 Óbroytt
- ☐4 Tey eru minkað í ávísan mun
- ☐5 Tey eru minkað í stóran mun
- ☐6 Veit ikki

**18. Eru eftirútbúgving og førleikamenning neyðug í tínum starvi?** *(set bert ein kross)*

- ☐1 Í stóran mun
- ☐2 Í ein ávísan mun
- ☐3 Í minni mun
- ☐4 Als ikki
- ☐5 Veit ikki

**19. Heldur tú, at møguleikarnir fyri førleikamenning og eftirútbúgving eru nøktandi?** *(set bert ein kross)*

- ☐1 Í stóran mun
- ☐2 Í ein ávísan mun
- ☐3 Í minni mun
- ☐4 Als ikki
- ☐5 Veit ikki

## Nøgdsemi í arbeiðinum

**20. "Tað góða arbeiðið" – hvat merkir tað fyri teg?**
Skuldi tú valt millum tey viðurskiftini, sum eru nevnd niðanfyri, hvørji fimm hevði tú so raðfest hægst?
(*set í mesta lagi 5 krossar*)

- ☐a Góða løn
- ☐á At hava góðar fysiskar karmar
- ☐b Arbeiða í somu bygd/øki, sum eg búgvi
- ☐d At arbeiðstíðin passar til mín
- ☐ð Samanhangur millum arbeiði og frítíð
- ☐e At starvið passar til míni evni og førleikar
- ☐f At arbeiða sjálvstøðugt
- ☐g Tryggar arbeiðsumstøður
- ☐h At vera saman við fólki
- ☐i Dámligar starvsfelagar
- ☐í Góð leiðsla
- ☐j Ávirkan og demokrati
- ☐k Fjølbroytt arbeiði
- ☐l Møguleikar at læra nakað nýtt
- ☐m Spennandi og krevjandi avbjóðingar
- ☐n Møguleikar at koma í hægri starv
- ☐o At gera mun í arbeiðinum
- ☐ó At arbeiðið er samfelagsgagnligt

**21. Heldur tú, at tað er samsvar millum arbeiðið, sum tú hevur nú og "tað góða arbeiðið", sum tú hugsaði um í svarinum omanfyri?** *(set bert ein kross)*

- ☐1 Í stóran mun
- ☐2 Í ein ávísan mun
- ☐3 Í minni mun
- ☐4 Als ikki
- ☐5 Veit ikki

**22. Ert tú sum heild nøgd í tínum arbeiði?** *(set bert ein kross)*

- ☐1 Ja, í stóran mun
- ☐2 Ja, í ein ávísan mun
- ☐3 Nei, einans í minni mun
- ☐4 Nei, als ikki
- ☐5 Veit ikki

**23. Hevur arbeiðið stóran týdning fyri teg?** *(set bert ein kross)*

☐₁ Ja, í stóran mun ☐₃ Nei, einans í minni mun ☐₅ Veit ikki

☐₂ Ja, í ein ávísan mun ☐₄ Nei, als ikki

**24. Ert tú stolt av starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur?** *(set bert ein kross)*

☐₁ Ja, í stóran mun ☐₃ Nei, einans í minni mun ☐₅ Veit ikki

☐₂ Ja, í ein ávísan mun ☐₄ Nei, als ikki

**25. Kundi tú hugsað tær at verði á arbeiðsplássinum restina av arbeiðslívinum?** ☐₁ Ja ☐₂ Nei ☐₃ Veit ikki

**26. Hvussu metir tú samsvarið vera millum arbeiðsnøgdina og lønina?** *(set bert ein kross)*

☐₁ Alt ov nógv arbeiði í mun til lønina
☐₂ Eitt sindur ov nógv arbeiði í mun til lønina
☐₃ Hóskandi arbeiði í mun til lønina
☐₄ Eitt sindur ov lítið arbeiði í mun til lønina
☐₅ Alt ov lítil arbeiði í mun til lønina
☐₆ Veit ikki

**27. Hvussu metir tú samsvarið vera millum ábyrgdina tú hevur í arbeiðinum og lønina?** *(set ein kross)*

☐₁ Alt ov nógv ábyrgd í mun til lønina
☐₂ Eitt sindur ov nógv ábyrgd í mun til lønina
☐₃ Hóskandi ábyrgd í mun til lønina
☐₄ Eitt sindur ov lítil ábyrgd í mun til lønina
☐₅ Alt ov lítil ábyrgd í mun til lønina
☐₆ Veit ikki

**28. Ert tú nøgd við tær viðbøtur, tú fært fyri ...............?** *(set bert ein kross við hvønn spurning)*

| | **Í stóran mun** | **Í ávísan mun** | **Í minni mun** | **Als ikki** | **Spurningurin er ikki viðkomandi** |
|---|---|---|---|---|---|
| “Ólagaligar arbeiðstíðir” | ☐₁ | ☐₂ | ☐₃ | ☐₄ | ☐₅ |
| Ábyrgd og førleika | ☐₁ | ☐₂ | ☐₃ | ☐₄ | ☐₅ |
| Annað (telefonviðbøtur v.m.) | ☐₁ | ☐₂ | ☐₃ | ☐₄ | ☐₅ |

**29. Spurningar um arbeiðið sum heild. Hvussu væl nøgd ert tú við..............?**
*(set bert ein kross við hvønn spurning, og svarað vinarliga øllum spurningunum)*

| | **Sera væl nøgd** | **Nøgd** | **Ónøgd** | **SERA ÓNØGD** |
|---|---|---|---|---|
| a. Framtíðarvánirnar í arbeiðinum? | ☐₁ | ☐₂ | ☐₃ | ☐₄ |
| á. Arbeiðsumstøður? | ☐₁ | ☐₂ | ☐₃ | ☐₄ |
| b. Mátan tíni evni verða nýtt ? | ☐₁ | ☐₂ | ☐₃ | ☐₄ |
| d. Sosiala arbeiðsumhvørvið? | ☐₁ | ☐₂ | ☐₃ | ☐₄ |

**30. Er títt nøgdsemi við arbeiðið broytt seinnu árini?** *(set bert ein kross)*

☐₁ Ja, til tað betra ☐₃ Ja, til tað verra ☐₅ Veit ikki

☐₂ Nei, tað er óbroytt ☐₄ Spurningurin ikki viðkomandi, tí eg havi verið so stutt í starvi

**31. Hevur tú av álvara umhugsað at søkt annað starv seinastu árini?** *(set bert ein kross)*

☐₁ Ja ☐₂ Ja, men eingir møguleikar eru fyri øðrum starvi innan mítt serøki ☐₃ Nei ☐₄ Veit ikki

**32. Um *ja*, hví hevur tú umhugsað at søkt annað starv?** *(tú kanst seta fleiri krossar)*

| | |
|---|---|
| ☐a Fyri at fáa nýggjar fakligar avbjóðingar | ☐ð Orsakað av heilsuni |
| ☐á Ynski um at royna nakað nýtt | ☐e Orsakað av familjuni |
| ☐b Arbeiðið er ov strævið | ☐f Orsakað av viðurskiftunum við starvsfelagarnar |
| ☐d Tað eru ov nógvar ósemjur | ☐g Veit ikki |

**33. Heldur tú, at ónøgdin ella nøgdsemi millum sjúkrarøktarfrøðingar sum heild eru broytt tey seinastu 10 til 15 árini?** *(set bert ein kross)*

| | |
|---|---|
| ☐1 Ja, nøgdsemið er vaksið í stóran mun | ☐5 Ja, ónøgdin er vaksin í stóran mun |
| ☐2 Ja, nøgdsemið er vaksið í ein ávísan mun | ☐6 Spurningurin er óviðkomandi, tí eg havi verið so stutt í starvi |
| ☐3 Støðan er óbroytt | ☐7 Veit ikki |
| ☐4 Ja, ónøgdin er vaksin í ein ávísan mun | |

## Arbeiðsumhvørvið

**34. Hvussu vilt tú lýsa arbeiðsumhvørvið?** *(set bert ein kross við hvønn spurning, og svara vinarliga øllum spurningunum)*

| | Í stóran mun | Í ávísan mun | Í minni mun | Als ikki | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|
| a. Fólk eru opin fyri uppskotum og nýggjum tiltøkum | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| á. Fólk stuðla hvørjum øðrum og loysa trupulleikarnar í felag | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| b. Hvør passar sítt | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| d. Tað eru nógvar óloystar ósemjur | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| ð. Umhvørvið er fakliga kveikjandi og spennandi | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| e. Gott kollegialt umhvørvi | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| f. Góð viðurskifti millum leiðslu og sjúkrarøktarfrøðingar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| g. Eitt gott og vinarligt umhvørvi | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| h. Eitt strongjandi umhvørvi | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| i. Ein køvandi stemningur | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| í. Umhvørvið er eyðkent av stagnatión | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| j. Teir fysisku karmarnir eru nøktandi | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| k. Tey amboð (bilur, fartelefon, telda v.m.) tær tørvar, eru nøktandi. | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |

**35. Hvussu nógva ávirkan hevur tú í arbeiðinum?**
*(set bert ein kross við hvønn spurning, og svara vinarliga øllum spurningunum)*

| | **Altíð** | **Ofta** | **Onkuntíð** | **Sjáldan** | **Ongantíð/ Næstan ongantíð** |
|---|---|---|---|---|---|
| a. Hevur tú stóra ávirkan á, hvørjar avgerðir verða tiknar um títt arbeiði? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| á. Hevur tú ávirkan á, hvat tú gert í tínum arbeiði? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| b. Hevur tú ávirkan á, hvønn tú arbeiðir/ert á vakt saman við? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| d. Hevur tú ávirkan á nøgdina av arbeiði? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |

**36. Veitst tú greitt, hvørja ábyrgd tú hevur í arbeiðinum?** *(set bert ein kross)*

| | | |
|---|---|---|
| □1 Í stóran mun | □3 Í minni mun | □5 Veit ikki |
| □2 Í ein ávísan mun | □4 Als ikki | |

**37. Mótstríðandi krøv í arbeiðinum.**
*(Set bert ein kross við hvønn spurning, og svara vinarliga øllum spurningunum)*

| | Í sera stóran mun | Í stóran mun | Lutvíst | Í lítlan mun | Í sera lítlan mun |
|---|---|---|---|---|---|
| a. Mást tú viðhvørt gera okkurt í arbeiðinum, sum tú heldur vera óneyðugt? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| á. Mást tú viðhvørt gera okkurt, sum eftir røttum átti at verið gjørt øðrvísi? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| b. Verða mótstríðandi krøv sett í tínum arbeiði? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| d. Gert tú okkurt í arbeiðinum, sum nøkur góðtaka og onnur ikki? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |

**38. Krøv í arbeiðinum**
*(set bert ein kross við hvønn spurning, og svara vinarliga øllum spurningunum)*

| | Altíð | Ofta | Onkuntíð | Sjáldan | Ongantíð/ Næstan ongantíð |
|---|---|---|---|---|---|
| a. Er neyðugt at arbeiða sera skjótt? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| á. Er arbeiðið ójavnt býtt, so at tað hópar seg upp? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| b. Hvussu ofta hendir, at tú ikki nær allar arbeiðsuppgávurnar? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| d. Er neyðugt at arbeiða yvirtíð? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| ð. Mást tú leypa steðgir um, tí tað er ov nógv at gera? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| e. Er neyðugt at hava yvirlit yvir nógv ymiskt samstundis í arbeiðinum? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| f. Krevur arbeiðið, at tú dugir væl at koma við hugskotum? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| g. Krevur arbeiðið, at tú minnist nógv? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| h. Krevur arbeiðið, at tú tekur torførar avgerðir? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| i. Hvussu ofta kemur tú í kensluliga torførar støður? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| í. Er arbeiðið kensluliga tyngjandi? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| j. Verður tú kensluliga rørd av arbeiðinum? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| k. Krevur arbeiðið, at tú letur vera við at siga tína hugsan? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |
| l. Krevur arbeiðið, at tú goymir tínar kenslur? | □1 | □2 | □3 | □4 | □5 |

**39. Heldur tú, at krøvini frá brúkaranum/sjúklinginum eru broytt seinnu árini?** *(set bert ein kross)*

| | | |
|---|---|---|
| □1 Tey eru økt í stóran mun | □3 Óbroytt | □5 Tey eru minkað í stóran mun |
| □2 Tey eru økt í ávísan mun | □4 Tey eru minkað í ávísan mun | □6 Veit ikki |

**40. Í hvønn mun er talið av brúkarum/sjúklingum fyri hvønn sjúkrarøktarfrøðing á arbeiðsplássinum nøktandi?** *(set bert ein kross)*

☐1 Í stóran mun ☐3 Í minni mun ☐5 Veit ikki
☐2 Í ein ávísan mun ☐4 Als ikki

**41. Er talið av starvsfólki á arbeiðsplássinum í samsvar við normeringarnar?** ☐1 Ja ☐2 Nei ☐3 Veit ikki

**42. Hvussu ert tú nøgd við møguleikarnar fyri supervisión á tínum arbeiðsplássi?** *(set bert ein kross)*

☐1 Sera væl ☐3 Nøkulunda ☐5 Sera illa
☐2 Væl ☐4 Illa ☐6 Veit ikki

**43. Fært tú upplýsingar um týdningarmiklar avgerðir, broytingar og framtíðarætlanir á arbeiðsplássinum í góðari tíð?** *(set bert ein kross)*

☐1 Í stóran mun ☐3 Í minni mun ☐5 Veit ikki
☐2 Í ein ávísan mun ☐4 Als ikki

**44. Í hvønn mun kanst tú siga, at tín nærmasti leiðari......?**
*(set bert ein kross við hvønn spurning, og svara vinarliga øllum spurningunum)*

| | Í sera stóran mun | Í stóran mun | Lutvíst | Í lítlan mun | Í sera lítlan mun |
|---|---|---|---|---|---|
| a. Syrgir fyri, at tann einstaki sjúkrarøktarfrøðingurin hevur góðar menningarmøguleikar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| á. Raðfestir trivnað á arbeiðsplássinum høgt? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| b. Dugir væl at leggja arbeiðið til rættis? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| d. Dugir væl at loysa konfliktir? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |

**45. Samstarv, feedback og felagsskapur á arbeiðsplássinum?**
*(set bert ein kross við hvønn spurning, og svarað vinarliga øllum spurningunum)*

| | Altíð | Ofta | Onkuntíð | Sjáldan | Ongantíð/ Næstan ongantíð |
|---|---|---|---|---|---|
| a. Hvussu ofta fært tú hjálp og stuðul frá starvsfeløgum? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| á. Hvussu ofta eru starvsfelagarnir til reiðar at lurta eftir tínum trupulleikum í arbeiðinum? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| b. Hvussu ofta fært tú hjálp og stuðul frá tínum nærmasta leiðara? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| d. Hvussu ofta eru tínir nærmastu leiðarar til reiðar at lurta eftir tínum trupulleikum í arbeiðinum? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| ð. Er stemningurin millum teg og starvsfelagarnir góður? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| e. Kennir tú teg sum partur av einum felagsskapi á arbeiðsplássinum? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| f. Er samstarvið millum starvsfelagarnar gott? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| g. Hvussu ofta tosar tú við tín nærmasta leiðara um, hvussu gott tú gert títt arbeiði? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| h. Hvussu ofta tosar tú við starvsfelagarnar um, hvussu gott tú gert títt arbeiði? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| i. Hvussu ofta tosar tú við starvsfelagarnar um, hvussu gott tey gera teirra arbeiði? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| í. Hvussu ofta hevur tú fakliga sparring við starvsfelagarnar (t.d. vegleiðing/supervisión)? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| j. Hvussu ofta hevur tú fakliga sparring við tín nærmasta leiðara (t.d. vegleiðing/supervisión)? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |
| k. Arbeiðir tú avskorin frá starvsfeløgum? | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 |

**46. Heldur tú, at tað tey seinnu árini hava verið fleiri ella færri ósemjur á tínum arbeiðsplássi?**

☐1 Fleiri
☐3 Færri
☐2 Óbroytt
☐4 Veit ikki / tað hava ikki verið ósemjur av týdningi

**47. Um ósemjur hava verið, hvørjar heldur tú so orsøkirnar vera?** *(tú kanst seta fleiri krossar)*

☐1 Leiðslustílurin
☐3 Ov stór arbeiðsmongd/strongd
☐5 Ov nógvar broytingar í senn
☐2 Mismunur verður gjørdur
☐4 Umsitingarligar broytingar
☐6 Veit ikki

| **48. Hvussu er samstarvið við aðrar fakbólkar?** *(set bert ein kross við hvønn spurning, og svarað vinarliga øllum spurningunum)* | **Sera gott** | **Gott** | **Nøktandi** | **Ikki nóg gott** | **Als ikki nóg gott** | **Veit ikki/Ikki viðkomandi** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| a. Fysio- og ergoterapeutar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| á. Heilsuatstøðingar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| b. Heilsuhjálparar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| d. Laborantar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| ð. Læknar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| e. Portørar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| f. Sjúkrahjálparar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |

**49. Í hvønn mun sært tú nýggjar fakbólkar (t.d. heilsuatstøðingar) sum eina hóttan ímóti tínum starvi?**

☐1 Í stóran mun ☐3 Í minni mun ☐5 Veit ikki

☐2 Í ein ávísan mun ☐4 Als ikki

**50. Hvussu er samstarvið við aðrar almennar stovnar?** *(set bert ein kross við hvønn spurning)*

| | **Sera gott** | **Gott** | **Nøktandi** | **Ikki nóg gott** | **Als ikki nóg gott** | **Veit ikki/Ikki viðkomandi** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| a. Barnavernd | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| á. Heilsufrøðisskipanina | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| b. Heimarøktina | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| d. Sernámsdepilin | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| ð. Sjúkrahús | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |
| e. Skúlar | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 | ☐5 | ☐6 |

**51. Hvussu heldur tú, at sparingar innan heilsuverkið hava broytt arbeiðsumstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum?** *(set bert ein kross)*

☐1 Til tað betra ☐3 Til tað verra

☐4 Veit ikki

☐2 Óbroytt

**52. Hvussu heldur tú, at yvirtøkur av viðgerðum innan heilsuverkið hava broytt arbeiðsumstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum?** *(set bert ein kross)*

☐1 Til tað betra ☐3 Til tað verra

☐4 Veit ikki

☐2 Óbroytt

**53. Hvussu heldur tú, at umleggingarnar innan heilsuverkið seinnu árini hava broytt arbeiðsumstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum?** *(set bert ein kross)*

☐$_1$ Til tað betra ☐$_2$ Óbroytt ☐$_3$ Til tað verra ☐$_4$Veit ikki

## Virðingin fyri starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur

**54. Hvussu heldur tú, at arbeiðið tú gert sum sjúkrarøktarfrøðingur sum heild, verður virðismett av.....?**
*(set bert ein kross við hvønn spurning, og svara vinarliga øllum spurningunum)*

| | Í stóran mun | Í ávísan mun | Í minni mun | Als ikki | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|
| a. Brúkaranum/sjúklinginum | ☐$_1$ | ☐$_2$ | ☐$_3$ | ☐$_4$ | ☐$_5$ |
| á. Nærmastu leiðslu | ☐$_1$ | ☐$_2$ | ☐$_3$ | ☐$_4$ | ☐$_5$ |
| b. Ovastu leiðslu | ☐$_1$ | ☐$_2$ | ☐$_3$ | ☐$_4$ | ☐$_5$ |
| d. Almenninginum | ☐$_1$ | ☐$_2$ | ☐$_3$ | ☐$_4$ | ☐$_5$ |
| ð. Politisku myndugleikunum | ☐$_1$ | ☐$_2$ | ☐$_3$ | ☐$_4$ | ☐$_5$ |

**55. Heldur tú, at virðingin hjá politisku myndugleikunum fyri starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur er broytt tey seinastu árini?** *(set bert ein kross)*

☐$_1$ Til tað betra

☐ Óbroytt

☐$_3$ Til tað verra

☐$_4$ Veit ikki

**56. Heldur tú, at virðingin hjá almenninginum fyri starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur er broytt tey seinastu árini?** *(set bert ein kross)*

☐$_1$ Til tað betra

☐$_2$ Óbroytt

☐$_3$ Til tað verra

☐$_4$ Veit ikki

**Hevur tú aðrar viðmerkingar um, hvussu tað er at vera sjúkrarøktarfrøðingur í Føroyum í dag, so kanst tú skriva tær her:**

Takk fyri ómakin!